B Ú S K A P A R R Á Ð I Ð

# BÚSKAPARFRÁGREIÐING

HEYSTIÐ 2009

6. NOVEMBER 2009

# INNIHALDSYVIRLIT

BÚSKAPARRÁÐIÐ ..... 3
1. SAMANDRÁTTUR OG TILMÆLI ..... 4
2. KONJUNKTURMETING ..... 7
2.1 Seinasta konjunkturgongd ..... 7
2.2 Umheimurin ..... 9
2.3 Gjaldsjavnin ..... 10
2.4 Tað almenna ..... 11
2.4.1 Landið ..... 12
2.4.3 Kommunurnar ..... 12
2.4.4 Sosialu grunnarnir ..... 12
2.5 Húsarhaldini ..... 13
2.6 Tilfeingisvinnurnar ..... 14
2.6.1 Botnfiskiveiða í føroyoyskum sjógvi ..... 14
2.6.2 Botnfiskiveiða á fjarleiðum ..... 15
2.6.3 Uppsjóvarvinna ..... 15
2.6.4 Alivinna ..... 16
2.6.5 Samanumtikið um tilfeingisvinnurnar ..... 16
2.7 Fíggjargeirin ..... 16
2.8 Aðrar vinnur ..... 17
2.8 1 Fiskavirking ..... 17
2.8.2 Byggivinnan ..... 17
2.8.3 Handils- og tænastuvinnurnar ..... 18
3. BÚSKAPARSTØÐAN OG AVBJÓÐINGIN Í LØTUNI ..... 19
4. FÍGGJARPOLITISKAR MEGINREGLUR ..... 21
4.1 Fíggjarpolitikkur skal vera haldførur ..... 21
4.2 Virkin fíggjarpolitikkur einans í serligum førum ..... 23
4.3 Stremban eftir búskapar- og fíggjarligum rásarúmi ..... 24
5. FÍGGJARPOLITIKKURIN HJÁ TÍ ALMENNA ..... 25
5.1 Førdi fíggjarpolitikkurin haldførur? ..... 25
5.1.1 Ábendingar um bygnaðarligt hall ..... 27
5.1.2 Skattatrýstið ..... 29
5.2 Er talan um serligt føri? ..... 30
5.3 Er rásarúm til staðar? ..... 31
5.3.1. Høvuðsatlit at almenna kredittvirðinum ..... 32
6. FÍGGJARPOLITISK ÁTØK ..... 35
6.1 Breiðkan av inntøkugrundarlagi ..... 35
6.2 Raðfesta íløgur ..... 36
6.3 Fíggjarstýra landi og kommunum ..... 39
ORÐALISTI ..... 41
BÓKMENTIR ..... 45

# BÚSKAPARRÁÐIÐ

Búskaparráðið gevur við hesum út konjunkturfrágreiðingina, sum eftir løgtingslóg nr. 50 frá 11. mai 2009 um búskaparráð, skuldi koma út 1. september 2009. Orsakað av at nýsetta ráðið ikki varð sett fyrr enn 1. juli í 2009, kemur frágreiðingin hesaferð út seinri enn vanligt.

Valskeiðið hjá hesum búskaparráðnum er 3 ár og 6 mánaðir frá 1. juli í 2009 at rokna. Búskaparráðið hevur til uppgávu at fylgja við búskaparligum viðurskiftum í landinum og at koma við óheftari búskaparligari ráðgeving og frágreiðingum um búskaparligu gongdina. Tað er ásett í lógini fyri Búskaparráðið, at tað skal geva 2 búskaparfrágreiðingar út um árið.

Skrivarauppgávan hjá nýggja Búskaparráðnum er við avtalu løgd til Landsbankan at taka sær av.

Limir ráðsins eru:

Thomas Dam, *M.Sc. Financial Management and International Trade, formaður*

Durita Tausen, *cand.scient.oecon*

Gunn Danielsen, *cand.polit*

# 1. SAMANDRÁTTUR OG TILMÆLI

**Búskaparliga afturgongdin avhæsað** Tekin eru um, at stígurin í búskapinum, sum kom í á heysti í 2008, er um at hæsa av. Arbeiðsloysið er góð 4% av arbeiðsfjøldini. Hóast afturgongdin tykist vera fjarað, er enn ov tíðliga at siga við vissu, um vøkstur er í búskapinum aftur.

**Føroyski búskapurin sum heild væl fyri** Føroyski búskapurin er ikki illa fyri, hóast avbjóðingar vera næstu árini. Skuldin er lutfalsliga lítil í øllum geirum í búskapinum, arbeiðsloysið er lítið, og hagtølini benda á avlop á gjaldsjavnanum.

**...men hallið hjá landskassanum er ov stórt** Inntøkurnar hjá landskassanum minkaðu munandi fjórða ársfjórðing í 2008 og eru minkaðar aftur í ár, serliga tí at húsarhaldini hava brúkt minni enn undanfarin ár. Hallið hjá landskassanum gjørdist góðar 330 mió. kr. í 2008, og í ár verður tað væntandi góðar 800 mió. kr. Eftir fíggjarlógaruppskotinum fyri 2010 verður hallið góðar 770 mió. kr. næsta ár.

Verður hugsað um, at arbeiðsloysið er góð 4%, er hetta stórt hall at hava hjá landskassanum. Havt skal eisini vera í huga, at rokningin fyri hallið árini 2008–2010 verður at rinda aftur við avlopum hjá landskassanum í framtíðini, umframt at rentuútreiðslurnar hjá landskassanum fara at vaksa næstu árini.

**Neyðugt við tiltøkum** Tað er tó umráðandi, at tiltøk verða sett í verk, sum fáa ójavnan burtur í førda inntøku- og útreiðslupolitikkinum, soleiðis at fíggjarpolitikkurin aftur verður haldførur. Ávíst rásarúm er í búskapinum, so tað almenna kann hava ávíst hall í nøkur ár, men verða tiltøk ikki sett í verk, gerst alt tyngri at koma aftur á beint. Ein fortreyt fyri jøvnum búskaparvøkstri er, at fíggjarpolitikkurin hjá tí almenna er haldførur.[1]

**Tvey høvuðsatlit at taka** Mælt verður til, at búskapar- og fíggjarpolitikkurin næstu árini tekur tvey høvuðsatlit. Í fyrra lagi eigur fíggjarpolitikkurin at taka atlit at lágkonjunkturinum, sum er og tí, at óvissa er um, hvussu drúgvur lágkonjunkturin í føroyska búskapinum og í umheiminum verður. Í øðrum lagi eigur fíggjarpolitikkurin næstu árini at taka atlit at at fáa fíggjarpolitikkin haldføran eftir eitt miðallangt tíðarskeið.

**Bygnaðarligir skeivleikar** Týðandi partar av hallinum hjá tí almenna árini 2008–2010 eru bygnaðarligir, og standast sostatt meiri av skeivum fíggjarpolitikki undanfarin ár enn av konjunkturniðurgongd í búskapinum. Tiltøk, ið verða sett í verk næstu árini til tess at bøta um bygnaðarligar skeivleikar í inntøku- og útreiðslupolitikkinum hjá tí almenna, nýtast tó ikki at hava sum endamál at fáa alt hallið hjá tí almenna at hvørva. Ein partur av hallinum hvørvur av sær sjálvum, tá ið meiri ferð kemur aftur á búskapin og nýtsluna. Tískil eiga tiltøkini at vera stílað eftir bygnaðarliga partinum av hallinum.

**...krevja skjótar broytingar** Mælt verður til, at farið verður sum skjótast undir tilgongdina at fáa almennar inntøkur og útreiðslur at javnviga aftur, og meðan tað almenna hevur fíggjarpolitiskt rásarúm. Á henda hátt kann sleppast undan, at tað almenna

[1] At fíggjarpolitikkurin hjá tí almenna er haldførur, merkir, at tað almenna við skatta- og útreiðslupolitikkinum, sum er, er ført fyri at røkja sínar skyldur og rinda rentur og avdráttir av útistandandi skuld.

noyðist at seta harðligari tiltøk í verk seinri. Verður neyðugt seinri við ógvisligum tillagingum til tess at fáa almennar inntøkur og útreiðslur at javnviga, er vandi fyri, at nógv fólk flyta av landinum.

Miðvís og bindandi ætlan Tað er umráðandi, at ein miðvís og bindandi ætlan verður løgd fyri, hvussu fíggjarpolitikkurin verður haldførur eitt miðallangt tíðarskeið.

At politiska skipanin setir sær greið og týðilig mál at fáa samsvar millum inntøkur og útreiðslur hjá landskassanum næstu árini, bøtir um trúvirðið á ætlanirnar og boðar almenninginum frá, at greiðar ætlanir eru at minka hallið. Eisini ger tað ætlanirnar meira bindandi og bøtir um sannlíkindini at ætlanirnar bera á mál[2].

Alneyðugt at fáa javnvág Almennar inntøkur og útreiðslur kunnu fáast at javnviga við at vaksa almennu inntøkurnar, og at lækka almennar rakstrarútreiðslur og íløgur. Sum liður í tilgongdini at fáa inntøkur og útreiðslur hjá tí almenna at javnviga aftur, skal verða hugt at bæði inntøkugrundarlagnum, rakstrarútreiðslunum og íløgunum. Tað ger ætlanirnar lættari at fremja í verki politiskt og styrkir kensluna av, at allir partar í samfelagnum bera sín part av tillagingunum.

Ímyndir av RLÚ-avlopi undir ymsum fortreytum — MYND 1




Kelda: Landsroknskapur, fíggjarlógaruppskot fyri 2010 og egnar útrokningar

Fyri at vísa á, hvussu týðandi tað er at fáa javnvág, eru í mynd 1 lýst fimm einføld dømi, hvussu gongdin í inntøkum og útreiðslum hjá landskassanum fram til 2015 kann fara at verða. Allar fimm ímyndirnar eru grundaðar á árligan inntøkuvøkstur, sum er 3% samanhildið við fimm ymsum broytingum í útreiðslunum. Myndin vísir, at hóast árligan inntøkuvøkstur á 3%, so skulu útreiðslurnar minka øll hesi árini fyri at fáa javnvág í. M.a. sæst, at um politiska skipanin bindur seg til árliga at minka útreiðslurnar 2%, fæst aftur javnvág og avlop í 2014 við samanlagdari meiri skuld árini 2010 til 2014 á 1,4 mia. kr. Verður útreiðsluvøksturin harafturímóti næstu fáu árini t.d. 2%, og inntøkuvøksturin er 3%, so er skuldin hjá landskassanum vaksin meira enn 4 mia. kr. árini 2010 til 2015, samstundis sum hallið hjá landskassanum ikki minkar stórvegis.

Boða frá tiltøkum í góðari tíð Tað er umráðandi, at myndugleikarnir greitt boða frá, hvørjar inntøkur hjá tí almenna ætlanin er at vaksa, eins og hvørjar útreiðslur og íløgur hjá tí almenna ætlanin ítøkiliga er at skerja. Hetta eigur at verða gjørt í eini stórari, yvirskipaðari langtíðarætlan, heldur enn við einstøkum *ad-hoc*-tiltøkum.

---

[2] Sí [15].

Ein møguleiki er at hækka skattainntøkurnar tíðaravmarkað við tí í hyggju, at gera ábøtur á almenna bygnaðin og raksturin, soleiðis at gjørligt verður at lækka skattainntøkurnar aftur seinri. Greið tekin eru um, at almenna bygnaðinum tørvar ábøtur, verður hugsað um stóra vøksturin undanfarin ár. Verður almenni geirin ov stórur, er vandi fyri, at hetta fær avlagandi ávirkan á virksemi og íløgur hjá privata geiranum í búskapinum. Ávirkanin av tí verður, at vøksturin í búskapinum minkar eftir eitt longri tíðarskeið.

Tað er umráðandi, at fíggjarpolitikkurin hereftir verður lagaður eftir tí veruleika, at sveiggini í føroyska búskapinum, og harvið eisini í almennu inntøkunum, eru lutfalsliga stór. Tí eigur útreiðslustigið í almenna geiranum ikki at vaksa, so hvørt "konjunkturtreytaðar" ("sykliskar") ella eingangsinntøkur falla til tað almenna. Inntøkur av hesum slagi kunnu hvørva brádliga við sveiggjunum í búskapinum, sum seinastu árini eru gott dømi um.

Tiltøk Fyri at gera fíggjarpolitikkin haldføran eiga at verða gjørd tiltøk á bæði inntøku- og útreiðslusíðuni. Nøkur tiltøk kunnu verða gjørd við stuttum skotbráði, men onnur tiltøk eru drúgvari, tí ávíst greiningararbeiði krevst.

Vaksa inntøkurnar Kannað skal verða, hvussu skattagrundarlagið kann verða rúmkað næstu árini. Samanborið við Danmark sæst, at í Føroyum stavar størri parturin av skattainntøkunum frá lønarskatti og meirvirðisgjaldi og at skattainntøkurnar til samans eru knýttar fastari at gongdini í búskapinum. Í Føroyum er m.a. partafelagsskatturin lægri, bústaðir verða ikki skattaðir, og inntøkurnar frá umhvørvisgjøldum eru í prosentum næstan bara helvtina so stórar sum í Danmark.

Skerja útreiðslurnar Sammett við gongdina í føroyska búskapinum, eru rakstrarútreiðslurnar hjá landinum vaksnar alt ov nógv seinastu árini.

Verða gjølligar kanningar gjørdar viðvíkjandi almenna geiranum, verður óivað greitt, at til ber at reka tað almenna skynsamari. Eisini hevði borið til at lækkað útreiðslurnar, vórðu almennar veitingar og stuðul meira heft at fíggjarstøðuni hjá tí, sum fær tær, soleiðis at veitingar og stuðul mest vórðu latin teimum, ið hava tey fyri neyðini.

Áseta brúkaragjøld At enda kunnu almennu inntøkurnar vaksa av at seta í gildi lutvís brúkaragjøld á almennar tænastur. Lutvís brúkaragjøld eru longu á fleiri almennum tænastum, t.d. á barnaansing, tannlæknaviðgerð, ymsum heilivági og pørtum av samferðslukervinum.

Brúkaragjøld kunnu vera ein skilagóður háttur at tryggja, at almennar tænastur verða ikki latnar í førum, har tørvur ikki er á tí, og kunnu harafturat verða nýttar at stýra eftirspurninginum eftir almennum tænastum. Fyri at bøta munandi um almenna bygnaðin, er tí allarhelst neyðugt við brúkaragjøldum.

# 2. KONJUNKTURMETING

Hesin parturin av frágreiðingini, ið er skrivaður við grundarlagi í seinastu búskaparmeting frá Landsbankanum dagfest 13. oktober í 2009, lýsir konjunkturgongdina og tekur stutt samanum teir ymsu geirarnar í búskapinum, ið verða hildnir vera týdningarmiklir fyri gongdina og útlitini næstu 1-2 árini.

Føroyski búskapurin hevur eins og flest aðrir búskapir verið fyri afturgongd, eftir at altjóða fíggjarkreppan á heysti í 2008 gjørdist ein búskaparkreppa við beinleiðis ávirkan á framleiðsluna í at kalla øllum heimsins búskapum.

Ymsir stoytir uttanífrá hava ávirkað føroyska búskapin seinastu árini. Harafturat hava ymisk viðurskifti av meira bygnaðarligum slag gjørt, at almenni geirin hevur lutfalsliga stórt hall árini 2008-2010.

Samanrunnir stoytir uttanífrá og bygnaðarlig viðurskifti hava harafturat gjørt, at framleiðslan í fiskivinnuni - serliga í tí heimliga partinum - er fallin sera nógv seinastu 2-3 árini og er nú søguliga lág. Øll hesi viðurskifti ávirka búskapin, soleiðis at hann nú er í lágkonjunkturi. Tekin eru tó um, at lágkonjunktururin er um at hæsa av.

Álvarsligasti stoyturin, ið hevur rakt føroyska búskapin seinastu tíðina, er altjóða fíggjarkreppan. Fíggjarkreppan ávirkaði føroyska fíggjargeiran beinleiðis, við tað at fíggingarkostnaðurin hjá peningastovnunum vaks munandi av hægri rentustigi á lántøkuni í øðrum fíggjarstovnum og útreiðslum til bankapakkar. Sum heild tykist fíggjarheimurin at hava fótað sær aftur, nú ringastu brotasjógvarnir hava lagt seg, men varandi broytingar kunnu tó væntast, eitt nú herd kapitalkrøv til fíggjarfyritøkur.

At enda ávirkaði fíggjarkreppan húsarhaldini, við tað at tey minkaðu munandi um nýtsluna og vuksu uppsparingina, av tí at útlitini frameftir gjørdust meira óviss, virðið á sethúsum og frívirðið í teimum fall, umframt at atgongdin at fíggja nýtslu og at gera íløgur versnaði afturímóti undanfarin ár. Hetta hevur síðan ávirkað inntøkurnar hjá landskassanum, sum fær stórt hall árini 2008-2010.

Aðrir stoytir hava verið, ið hava ávirkað fiskivinnuna. Fiskaprísirnir eru lágir, og hetta tyngir raksturin, og hóast oljuprísirnir eru lægri nú enn í 2008, eru teir framvegis høgir afturímóti undanfarin ár. Vakstrarlíkindini í heimasjógvi hava verið undir miðal seinru árini. Bygnaðarligir trupulleikar, t.e. yvirkapasitetur og ov høgt veiðutrýst á stovnarnar í føroyskum sjógvi, gera harafturat, at lønsemið í heimligu fiskivinnuni ikki er eins høgt, og tað kundi verið við lægri veiðutrýsti og betri stovnsrøkt.

## 2.1 SEINASTA KONJUNKTURGONGD

Sambært bráðfeingistølum frá Hagstovu Føroya vaks BTÚ í leypandi prísum 0,5% í 2008. Ein partur av vøkstrinum í BTÚ í leypandi prísum stavar tó frá prísvøkstri á øllum vørum og tænastum. Við inflatión samsvarandi teirri í brúkaraprístalinum, 6,3% frá ársmiðal 2007 til ársmiðal 2008, er BTÚ í føstum prísum - tað sum í búskaparfrøðini verður kallað "framleiðsla" - fallið meira enn 5% í 2008. Í mynd 2 síggjast eisini framskrivingar Landsbankans av BTÚ í leypandi prísum.

Arbeiðsloysið í Føroyum er framvegis lítið, sí mynd 3, og fá lond hava minni arbeiðsloysi. Tøl frá ALS og Hagstovu Føroya benda harafturat á, at arbeiðsloysið er javnt lítið kring alt landið. Arbeiðsloysið í Norðuroyggjum tykist tó vera meiri enn aðrastaðni í landinum, eini 7,5%, og kemst hetta óivað av, at fiskivinnan í hesum øki hevur verið fyri stórum bakkasti. Búskapurin er tí framvegis nær við markið fyri, hvat hann kann framleiða.

Bruttotjóðarúrtøka í Føroyum 1998 til 2010, leypandi prísir — MYND 2




Kelda: Hagstova Føroya (1998 til 2008) og Landsbanki Føroya (2009 og 2010)

Nógv bendir á, at fallið í framleiðsluni helt fram nakað inn í 2009. Lønarútgjaldingar, sum við ávísum fyrivarnum kunnu tulkast sum eitt mát fyri alt virksemið í búskapinum, hava t.d. verið fallandi síðan á heysti 2008, sí mynd 5.

Árstíðarjavnað arbeiðsloysi í % av arbeiðsfjøld, jan-98 til aug-09 — MYND 3




Kelda: Hagstova Føroya og OECD

Tekin eru tó um, at niðurgongdin er um at fjara av, tó at tað enn er ov tíðliga at siga greitt, um veruligur vøkstur er aftur í búskapinum. Enn er eisini ov tíðliga at siga, um framleiðslan fer at falla enn meira, áðrenn hon veksur aftur. Støðugur vøkstur hevur verið í arbeiðsloysinum seinasta árið, men tekin eru um, at vøksturin kann fjara av seinri í ár og nakað inn í 2010, eins og fallið í lutfallinum MVG-inntøkunum/lønargjaldingum er fjarað av, sí mynd 5. Hetta eru ábendingar um, at afturgongdin í búskapinum er um at hæsa av.

Framrokning av tjóðarroknskapinum hjá Landsbanka Føroya bendir á, at BTÚ í leypandi prísum kann minka eini 3% í 2009 og kann vaksa eini 3% í 2010. Í verra førinum kann væntast, at BTÚ í leypandi prísum veksur uml. 1% í 2010. Í betra førinum kann tað vaksa upp í 6%. Framrokningarnar eru vístar í mynd 4.

Ein orsøk til afturgongdina í búskapinum seinasta árið ella so var, at húsarhaldini minkaðu nýtsluna og vuksu uppsparingina. Tekin eru um, at henda gongdin er um at hæsa av, og at uppsparingin er komin í eina legu, sum húsarhaldini kanska halda vera nóg mikið. Lutfallið millum MVG-inntøkur og lønir í mynd 5 er miðskeiðis í 2009 næstan tað lægsta,

sum tað hevur verið seinastu 10-15 árini. Enn er tó ov tíðliga at siga við vissu, um lutfallið kann falla nakað afturat, men húsarhaldini eru sum heild væl fyri, tó at øll ikki eru líka væl fyri. Treystikanningar benda á, at húsarhaldini eru minni dapurskygd um útlitini miðskeiðis í 2009, tí er kanska væntandi, at tey ikki minka nýtsluna enn meira.

Framskrivingar Landsbankans av BTÚ og lønum fyri 2009 og 2010 MYND 4




Kelda: Landsbanki Føroya

Gongd í lønum og MVG, jan-98 til aug-09 MYND 5




Kelda: Hagstova Føroya og TAKS

## 2.2 UMHEIMURIN

Ein lítil búskapur sum hin føroyski, har inn- og útflutningur fevna um stóran part av búskapinum, ávirkast nógv av gongdini í umheiminum og serliga í teimum londum, sum vit býta um vørur og tænastur við. Tað er serliga gjøgnum prísin á inn- og útflutningsvørum, at føroyski búskapurin ávirkast av gongdini í umheiminum, men eisini húsarhaldini og teirra nýtslu- og sparihugur ávirkast av gongdini í umheiminum. Gongdin í umheiminum fær tí nógv at týða, nær framleiðslan aftur verður vaksandi í føroyska búskapinum.

Sambært metingum frá IMF, ECB og Heimsbankanum er óvist, nær vøkstur aftur verður í heimsbúskapinum. Nakrir búskaparfrøðingar meta, at heimsbúskapurin fer at vaksa aftur seinri í ár, aðrir meta, at tað verður ikki fyrr enn í 2010 ella seinri, at vøkstur aftur verður í heimsbúskapinum. Talva 1 vísir seinastu metingar frá IMF um búskaparvøkstur.

Í betra førinum kann hugsast, at brúkarar og húsarhald longu í ár aftur fáa álit á førda fíggjarpolitikkin, og at fleiri tap og niðurskrivingar ikki vera í fíggjargeiranum. Í hesum førinum er møguleiki fyri, at búskapirnir fara at vaksa aftur longu í ár.

Harafturímóti er eisini møguleiki fyri, at stjórnirnar í vesturheiminum mugu seta eyka tiltøk í verk næstu 1-2 árini til tess at styrkja kapitalgrundarlagið í fíggjargeiranum, soleiðis at hann verður førur fyri at taka fleiri óvæntað tap og niðurskrivingar á seg; serliga um prísirnir á partabrøvum og fastari ogn falla enn meira næstu 1-2 árini. Fíggjargeirin verður í hesum førinum varnari at veita lán og kreditt, og atgongdin til fígging versnar mest sannlíkt. Hetta kann væntast at fáa tálmandi ávirkan á búskapin, og tað fer væntandi at ganga longri tíð, áðrenn álitið hjá húsarhaldum á fíggjarpolitikkin aftur batnar.

| Realur vøkstur í BTÚ í % um árið, 2007-2010 | | | | TALVA 1 |
|---|---|---|---|---|
| | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 |
| Heimsbúskapurin | 5,1 | 3,1 | -1,4 | 2,5 |
| USA | 2,0 | 1,1 | -2,6 | 0,8 |
| Týskland | 2,5 | 1,3 | -6,2 | -0,6 |
| Stóra Bretland | 2,6 | 0,7 | -4,2 | 0,2 |
| Evruøkið | 2,7 | 0,8 | -4,8 | -0,3 |

Viðm: 2009 og 2010 eru metingar hjá IMF
Kelda: IMF World Economic Outlook Update, July 8, 2009

Tann lánfíggjaða nýtslan, sum var so eyðsæð fyri kreppuna, er nú at kalla horvin, eisini hjá føroyingum og nógvastaðni eru fólk farin at spara upp. Serliga í londum har húsaprísir eru falnir nógv og frívirðið tí minkað, er uppsparingin vaksin og eginnýtslan minkað. Av tí at eginnýtslan hevur ógvuliga nógv at siga í øllum búskapinum, kann hetta eisini merkja minni búskaparvøkstur næstu árini. Í fleiri londum hava stjórnir vaksið almennu nýtsluna nógv við ymiskum hjálparpakkum í eini roynd at stimbra eftirspurningin eftir vørum og tænastum. Hesi tiltøk eru tíðaravmarkað, og óvist er, hvussu búskapargongdin verður, tá almenna nýtslan aftur minkar.

Forsøgnir um búskaparvøkstur skulu skiljast við tí fyrivarni, at tað er ógvuliga torført at spáa um, nær verulig vend kemur í heimsbúskapin. Hetta er serliga galdandi undir eini fíggjarkreppu sum tí, ið nú er. Haraftrat er óvissan í forsøgnum grundaðar á royndir frá øðrum fíggjarkreppum stór, við tað at fíggjarkreppan nú á fleiri økjum er ólík øðrum fíggjarkreppum. T.d. er vinnuligi bygnaðurin ein annar, almenni geirin er størri í flestum londum, skuldarstøðan hjá húsarhaldum og vinnufyritøkum er verri í summum stórum londum, inntøkugrundarlagið í heiminum er betri og meiri handil er av vørum og tænastum millum lond.

## 2.3 GJALDSJAVNIN

Umframt handilsjavnan er gjaldsjavnin handil, tænastur og flytingar í útlond og úr útlondum. Óvissan er stór í hagtølunum um føroyska gjaldsjavnan, og eingin uppgerð er nýggjari enn fyri 2006. Tølini skulu tí verða lisin við ávísum fyrivarni.

Sambært uppgerðunum hjá Hagstovu Føroya vóru avlopini stór í miðal árini 1998-2006, sí mynd 6. Tølini fyri 2003 og 2005 eru nógv ávirkað av, at tvey stór skip vórðu innflutt tey árini. 2006 er merkt av, at kredittfíggjað nýtsla av álvara tók dik á seg tað árið. Innflutningurin av drúgvum og hálvdrúgvum nýtsluvørum og av tilfari til byggivinnuna vaks ógvisliga tað árið, og hetta gav stórt hall á handilsjavnanum.

At døma eftir handilsjavnanum var mest sannlíkt hall á gjaldsjavnanum í 2007 á støðd við ella størri enn hallið í 2003. Hallið á handilsjavnanum í 2007 táttaði í 1,5 mia. kr., sum er tað størsta, ið er skrásett í Føroyum. Í 2008 var hallið á handilsjavnanum góðar 700 mió. kr. Avlopið á gjaldsjavnanum var í 2008 mest sannlíkt á støðd við avlopið í 2006. Avlopið í

2009 verður helst nakað størri at døma eftir gongdini í inn- og útflutningi higartil í ár, við tað at innflutningurin er fallin meira enn útflutningurin, sí mynd 7.

Rakstrarviðskifti gjaldsjavnans MYND 6




Kelda: Hagstova Føroya (1998-2006) og Landsbanki Føroya (2007-2010)

At døma eftir hagtølunum er við øðrum orðum avlop á gjaldsjavnanum, hóast almenni geirin hevur stór hall í løtuni. Alt tað, gjaldsjavnahagtølini eru eftirfarandi, merkir hetta, at privati geirin samantaldur, t.e. vinnan og húsarhaldini, hevur stór avlop og veksur uppsparingina nógv. Landsbankin hevur hóast stóra óvissu sett tøl á rakstrarviðskifti gjaldsjavnans fyri árini 2007–2010, sum eisini síggjast í mynd 6.

Handilsjavnin - inn- og útflutningur av vørum, jan-98 til jul-09 MYND 7




Viðm: Innflutningur og útflutningur byggja á 12 mánaðar leypandi sum
Kelda: Hagstova Føroya

## 2.4 TAÐ ALMENNA

Tað almenna er landið (landskassin), kommunur og sosialir grunnar. Haraftrat eru lands- og kommunufyritøkur (Rúsan, Apoteksverkið, SEV o.s.fr.) og almenn partafeløg (Føroya Tele, Vága Floghavn o.s.fr.) eisini partur av øllum almenna geiranum.

Av størstu einstaku búskaparpolitisku avbjóðingum næstu árini verður at fáa inntøkur og útreiðslur í almenna geiranum at javnviga, soleiðis at bygnaðarlig avlop verða hjá tí almenna næstu árini. Hetta verður m.a. neyðugt av demografiskum broytingum. Hetta verður serliga ein avbjóðing hjá landskassanum og hjá kommununum.

### 2.4.1 Landið

Seinastu árini hevur tað almenna virkað konjunkturstimbrandi við skattalættum og stórum útreiðsluvøkstri, hóast stóran búskaparvøkstur. Ógvisligi vøksturin í rakstrarútreiðslum í 2008 merkir, at landið hevur virkað beinleiðis stimbrandi á virksemið í 2008 og hevur forðað fyri niðurgongd í virkseminum.

Í 2009 er virknaðurin frá landinum minni stimbrandi, av tí at rakstrarútreiðslurnar (serliga vørukeyp og tænastur) eru skerdar á fíggjarætlanini fyri 2009 borin saman við roknskapartøl fyri 2008, men hallið veksur, tí at inntøkurnar minka.

Hallið hjá landskassanum var góðar 330 mió. kr. í 2008, og væntandi fer hallið við nýggjum inntøkumetingum og eykajáttanum at vera uml. 800 mió. kr. í 2009. 2010 kann tí gerast eitt trupult ár fyri landskassan. Felagsskatturin í 2010 verður munandi lægri enn í 2009, við tað at hann verður roknaður eftir roknskapum fyri 2009. Serliga felagsskatturin frá peningastovnunum verður munandi minni næsta ár. Harafturat hækka lønarútreiðslurnar hjá tí almenna eftir sáttmálunum, eins og útreiðslurnar á eldraøkinum væntandi hækka í 2010. At enda er ikki sannlíkt, at avgjaldsinntøkurnar næstu árini verða tað, tær vóru árini 2006-2008.

Í uppskotinum til fíggjarlóg 2010 væntar landsstýrið, at hallið verður 767 mió. kr. Útreiðslur at reka stovnar vaksa stívliga 1%, veitingar til húsarhald nakað tað sama, íløgur nakað meir, men inntøkurnar minka.

### 2.4.3 Kommunurnar

Ójavnt verður, hvussu kommunurnar fara at megna at halda sítt rakstrar- og íløguvirksemi næstu árini. Tórshavnar kommuna verður helst ikki serliga meint rakt av víkjandi skattainntøkum. Aðrar kommunur kunnu vænta at fáa víkjandi skattagrundarlag.

Kommunurnar fara sambært fyribils fíggjarætlanartølum at hava netto-útreiðslur (rakstrar- og íløguútreiðslur minus allar ikki-skattainntøkur) uml. 1.450 mió. kr. og skattainntøkur uml. 1.370 mió. kr. í 2009.

Mest sannlíkt hava kommunurnar samanlagt milt tálmandi til neutrala ávirkan á konjunkturgongdina í 2009 og helst meira tálmandi í 2010, tí at tær av fíggjarstøðuni meira ella minni noyðast at tátta í fyri at minka hallið.

Hesi undanfarnu árini hava kommunurnar vaksið bæði rakstrar- og íløguútreiðslur. Nú í niðurgongd minka tær íløgurnar.

Av tí at kommunurnar eru so ójavnt fyri fíggjarliga og hava so ójavna skuldarbyrðu at dragast við, er tað stór avbjóðing at fremja fyriskipanir, sum bæði hava fyrilit fyri landsins stýringartørvi sum heild og fyri tørvinum í teimum einstøku kommununum.

### 2.4.4 Sosialu grunnarnir

Sosialu grunnarnir, ALS og AMEG, megna at halda sítt ætlaða virksemi í 2009 og 2010, og serstakliga ALS kann sannlíkt virka stimbrandi á virksemið í búskapinum næstu tvey árini.

Við broytingunum í lógini um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, fer ALS væntandi at hækka útgjøldini úr uml. 50 mió. kr. í 2008 upp í uml. 137 mió. kr. í 2009. Hetta styrkir um keypsorkuna hjá arbeiðsleysum og minkar samstundis um óttan at gerast arbeiðsleys, og fær væntandi ta ávirkan, at húsarhaldini spara minni, enn tey annars høvdu gjørt.

Samanumtikið kann verða sagt, at teir sosialu grunnarnir megna at halda sítt ætlaða virksemi í 2009 og 2010. Harafturímóti verður torført hjá kommununum at varðveita verandi virksemi í 2009 og 2010. Almenni geirin hevur tí samanlagt trupult við at hava neyðuga gagnliga ávirkan í búskaparligari afturgongd, av tí at nóg góð stýring hevur ikki verið undanfarnu árini.

## 2.5 HÚSARHALDINI

Fleiri viðurskifti hava gingið húsarhaldunum ímóti í 2008 og 2009. Húsaprísirnir vóru hægstir á heysti 2007 og eru síðan falnir, sí mynd 9. Saman við vaksandi lántøkuni hevur prísfallið elvt til, at frívirðið í húsunum er fallið nærum 4 mia. kr. ella um 20%, men frívirðið er framvegis stórt. Partabrøvini, sum føroyingar eiga, og sum húsarhaldini helst eiga ein lítlan part av, eru til samans fallin 68% í marknaðarvirði (um 4 mia. kr.) sama tíðarskeið. Óvissan um útlitini í heimsbúskapinum og í pørtum av okkara egnu fiskivinnu er enn stór. Harumframt eru fíggjarstovnarnir vorðnir varnari við at hækka útlánini.

Lántøka (netto), lønarinntøka og útvaldar nýtsluvørur hjá húsarhaldum, jan-98 til aug-09 MYND 8




Viðmerking: Hagtøl fyri út- og innlán frá mar-08 og eftirfylgjandi stava frá nýggjum hagtalsuppgerðum, sostatt er eitt brot í tíðarrøðini
Kelda: Landsbanki Føroya og Hagstova Føroya

Hetta eru alt viðurskifti, sum gera, at tað ber til at skilja, at húsarhaldini eru vorðin varnari og hava minkað nýtsluna og vaksið uppsparingina. Øll hesi neiligu viðurskifti vera tó neyvan varandi. Bústaðarprísirnir fara neyvan at hækka aftur í bræði, men frívirðið er framvegis gott. Fleiri av føroysku listaðu fyritøkunum eru væl fyri fíggjarliga, sjálvt um marknaðarvirðið er lágt. Útlit eru tí fyri, at marknaðarvirðið kann hækka nakað aftur. Rentulegan ella fíggingarkostnaðurin hjá húsarhaldum er lækkað higartil í 2009, meira óvist er, hvat hendir við rentuni, tað, ið eftir er av árinum og í 2010.

Sum lýst við lutfallinum mvg/lønir í mynd 5, hava húsarhaldini minkað ógvuliga nógv nýtsluna frá heystinum 2007 til summarið 2009. Eisini sæst, at nýtslufallið svarar til vøksturin frá 2005 til 2007. Sambært gongdini í mynd 8 hava húsarhaldini minkað nýtsluna av drúgvum og hálvdrúgvum vørum í 2008 og 2009, samstundis sum tey hava minkað nýlántøkuna. Gongdin í ódrúgvum vørum tykist at fylgja meira gongdini í lønarinntøkum. Síðan oktober 2008 hava útlánini staðið í stað. Innlánini hjá húsarhaldum í peningastovnum eru vaksin. Hetta bendir á, at húsarhaldini sjálv hava tikið stig til at

minka nýtsluna, meira enn tað hevur verið atgongdin til fígging, sum hevur forðað vøkstri í nýtsluni.

Smb. treystikanningum hjá Fíggjarmálaráðnum viðvíkjandi húsarhaldunum, so samsvarar gongdin í nýtsluni, sum lýst omanfyri, rímiliga væl við væntanir hjá húsarhaldum. Tí kann ikki vera heilt burturvið at leggja dent á, at dapurskygnið hjá húsarhaldum um útlitini tykist at minka í seinastu kanningunum.

Føroysk húsarhald tykjast í altjóðasammeting at vera hampiliga væl fyri, sum heild. Virðið á sethúsum hækkaði nógv frá 2005 til 2007 og er síðan fallið aftur. Men sethúsini tykjast ikki at hava verið so yvirmett sum aðrastaðni (sí mynd 9), og tykjast tí ikki at hava fyri neyðini at falla so nógv meira. Skuldin hjá húsarhaldum er væl minni í Føroyum (75% av BTÚ) enn t.d. í Danmark (111% av BTÚ).

Samanumtikið er grund tí til at halda, at húsarhaldini fara at verða trygg við eina nýtslulegu, sum ikki er minni enn tann, sum nú er.

Realir sethúsaprísir í ymsum londum — MYND 9




Kelda: Hagstova Føroya, Eik Banki, OECD, Standard & Poor's, Central Statistics Office Ireland, Statistisk Sentralbyrå, Danmarks Statistik

## 2.6 TILFEINGISVINNURNAR

Til ber at býta tilfeingisvinnurnar í fýra bólkar, ið allir virka undir ymsum fortreytum ymsar tíðir. Tilfeingisvinnurnar kunnu verða býttar í botnfiskiveiðu í føroyskum sjógvi, botnfiskiveiðu á fjarleiðum, fiskiveiðu eftir uppsjóvarfiski og alivinnu.

Av hesum fýra bólkum hava tveir teirra - botnfiskiveiðan í føroyskum sjógvi og uppsjóvarvinnan - tað trupult í løtuni av stoytum uttanífrá og av viðurskiftum av meira bygnaðarligum slagi. Botnfiskiveiða á fjarleiðum og alivinnan geva harafturímóti gott og støðugt íkast í búskapin í løtuni.

### 2.6.1 Botnfiskiveiða í føroyoyskum sjógvi

Raksturin serliga hjá línuflotanum, lemma- og partrolarunum, ið royna í føroyskum sjógvi, er nógv tyngdur av lágum fiskaprísum umframt vánaligum fiskiskapi, Árini frammanundan vóru serliga høgir orkukostnaðir og vánaligur fiskiskapur, ið tyngdu raksturin.

Fiskiskapurin eftir toski og hýsu hevur leingi verið ógvuliga vánaligur. Mynd 10 vísir, hvussu nógv veiðan er fallin seinastu árini. Hetta er ein bygnaðarligur trupulleiki, við tað at veiðutrýstið í føroyskum sjógvi leingi hevur verið ov høgt, og stovnarnir sostatt ov hart troyttir. Eisini hava vakstrarlíkindini verið vánalig tey seinru árini.

## 2.6.2 Botnfiskiveiða á fjarleiðum

Hesin parturin av fiskivinnuni gevur sum víst á omanfyri gott og støðugt íkast í føroyska búskapin í løtuni. Royndin eftir toski og hýsu í Barentshavinum tykist sambært ICES at vera burðardygg, og útlitini tykjast vera støðug frameftir. Framleiðslan verður væntandi tann sama í 2009 sum í 2008, og útlit eru kanska til størri kvotu í 2010. Fiskaprísirnir hava tyngt raksturin nú í 1-2 ár, men oljuprísirnir eru lækkaðir og hava bøtt um raksturin. Ábendingar eru nú um, at fiskaprísirnir hækka aftur, tó at prísirnir eru lágir enn.

Indikatorar fyri føroyskan fiskiskap, jan-03 til aug-09 MYND 10




Kelda: Hagstova Føroya

## 2.6.3 Uppsjóvarvinna

Framleiðslan í uppsjóvarvinnuni er minkað munandi, serliga av tí at svartkjaftakvotan minkaði so nógv í 2009 og minkar 8,5% í 2010 eftir nýggju avtaluni millum strandalondini. Trupulleikin í uppsjóvarvinnuni er eisini av bygnaðarligum slagi, við tað at svartkjaftastovnurin í mong ár hevur verið ov hart troyttur, soleiðis at neyðugt nú var at minka kvoturnar ógvisliga til tess at verja stovnarnar.

Stovnsrøkt við uppsjóvarstovnunum er eitt sindur torfør, við tað at stovnarnir flyta nógv bornir saman við aðrar stovnar. Tískil er trupult hjá londunum at semjast um ein felags og haldføran fiskivinnupolitikk longri tíð, við tí úrsliti, at heildarroyndin hjá øllum londum gerst í meira lagi afturímóti lívfrøðiligu ráðgevingini.

Svartkjaftakvotan fall nógv í 2009 (uml. 53%) og minkar 8,5% í 2010. Harafturímóti vaksa kvoturnar av norðhavssild (8% vøkstur) og makreli (33% vøkstur) í 2009, og møguliga fer at bera til at fáa meiri virðisøking úr hesum tilfeinginum hereftir. Lodnan er vanliga týdningmikil, men trupult er at meta um útlitini, og mett verður, at nøgdirnar vera óstøðugar.

Indikatorar fyri alivinnuna, jan-03 til aug-09 MYND 11




Kelda: Hagstova Føroya

### 2.6.4 Alivinna

Alivinnan framleiðir tætt við kapasitetsmarkið, og er nú ein triðingur av øllum føroyska útflutninginum. Gongdin í alivinnuni er víst í mynd 11. Fyrstu sjey mánaðirnar í ár varð meira útflutt í virði av alifiski enn av botnfiski. Vinnan væntar, at í 2009 verður á leið nakað tað sama tikið av alifiski sum í 2008 ella nakað meiri. Somuleiðis eru ábendingar um, at í 2010 verður tikið á leið tað sama, hóast hesar metingar eru óvissar. Prísurin á alifiski er fallin nakrar mánaðir og nærkast framleiðslukostnaðinum. Laksaprísurin hevur annars verið góður leingi, og væntandi fer hann eisini at kunna halda sær, m.a. av tí, at alivinnan í Kili er ávirkað av ILA-smittu. Tó hava norskir laksaútflytarar vaksið útboðið rættiliga fitt í seinastuni, og trýstir hetta óivað prísin niðureftir.

### 2.6.5 Samanumtikið um tilfeingisvinnurnar

Samanumtikið eru tekin um, at framleiðslan í besta føri verður tann sama ella eitt vet hægri næstu 1-2 árini borin saman við 2008 og higartil í ár. Lágir fiskaprísir tyngja raksturin í løtuni, men óvist er, hvussu leingi teir vera so lágir. Oljuprísirnir eru framvegis lægri í miðal enn í 2008, men eru hækkaðir í ár, og óvist er, um teir fara at hækka nógv aftrat, ella um teir lækka aftur í næstum.

## 2.7 FÍGGJARGEIRIN

Rentustigið verður týdningarmikið fyri, hvussu gongdin í búskapinum verður næstu tíðina. Tjóðbankar kring heimin hava lækkað stuttu renturnar munandi seinasta árið ella so. Týdningarmeiri fyri gongdina í búskapinum vera tó útlánsrenturnar í peningastovnunum og tær treytir, sum vinnulív og húsarhald kunnu læna pening fyri at fíggja nýtslu og íløgur við.

Nógv bendir á, at fíggingarkostnaðurin hjá peningastovnum er vaksin seinasta árið ella so, m.a. av bankapakkum og høgum altjóðabankarentum. Harafturat eru fleiri tap og avsetingar á útlán í løtuni enn áður, hóast tapini í Føroyum eru minni enn t.d. í Danmark. Tí hava peningastovnarnir vaksið munin millum inn- og útlánsrenturnar. Útlánsrenturnar í peningastovnunum fyri 1. veðrættarlán eru ikki lækkaðar eins nógv og tjóðbankarenturnar (sí mynd 12). Ábendingar eru eisini um, at renturnar fyri útlán til fyritøkur eru hækkaðar í seinastuni.

Fíggjarstøðan hjá peningastovnunum er nærum óbroytt í stødd samanlagt frá mars 2008 til august 2009. Eisini sæst, at útlánini eru minkað umleið 1 mia. kr., men ognin av lánsbrøvum o.ø. er vaksin 2 mia. kr. Á skuldarsíðuni eru innlánini vaksin ½ mia. kr., útgivin skuldarbrøv eru økt 2,5 mia. kr. og skuldin til fíggjarstovnar (uttanlands) er minkað 1,7 mia. kr. Útlánini hjá peningastovnunum eru m.a. minkað hesa tíðina, tí at sethúsalán eru umfíggjað til realkredittlán.

Peningastovnarnir skylda framvegis fíggjarstovnum uttanlands 5,3 mia. kr. Mett verður ikki, at tað verður trupult at endurfíggja hesa skuldina tey fyrstu næstu árini, m.a. tí at teir kunnu fáa ríkisveðhald gjøgnum bankapakkarnar. Eisini verður møguleiki, soleiðis sum sum tað loysir seg fyri sethúsaeigararnar, at endurfíggja sethúsalán frá peningastovnum við realkredittlánum.

Sostatt tykist, at atgongdin til fígging verður kanska ikki forðing fyri at fíggja íløgur og rakstur hjá vinnulívi og húsarhaldum fyrst næstu árini.

Rentumunur á 1. veðr. sethúsalán í FO og útlánsrentu hjá DNB, jan-98 til okt-09 — MYND 12




Kelda: Eik Banki og Danmarks Nationalbank

## 2.8 AÐRAR VINNUR

Hetta eru framleiðslu- og tænastuvinnur, sum ikki eru nevndar omanfyri, men sum til samans eru stórur partur av øllum virðisvøkstrinum í føroyska búskapinum.

### 2.8 1 Fiskavirking

Afturgongdin í fiskiskapi sæst aftur í fiskavirking á landi, og væntað verður tískil, at afturgongdin, ið hevur verið í fiskavirking leingi, heldur fram tað, ið eftir er av 2009. Konjunkturbarometrið hjá Fíggjarmálaráðnum bendir á, at tað serliga eru rávørutilgongdin og atgongdin til fígging, ið avmarka framleiðsluna í løtuni.

At virka uppsjóvarfisk til mjøl og fóður fer væntandi eisini at minka, av tí at svartkjaftafiskiskapurin er verri í 2009 og væntandi eisini í 2010.

### 2.8.2 Byggivinnan

Umstøðurnar hjá byggivinnuni eru broyttar nógv seinasta árið ella so. Áður var tað vantandi arbeiðsmegi, ið avmarkaði byggivinnuna, men nú er tað tvørrandi eftirspurningur og verri atgongd til fígging, sum avmarka byggivinnuna. Konjunkturbarometrið hjá Fíggjarmálaráðnum bendir á, at vinnan er døpur um útlitini, tó at dapurskygnið kanska er linkandi.

Indikatorar fyri byggivinnuna, jan-03 til aug-09 — MYND 13




Kelda: Hagstova Føroya

Stórar almennar verkætkanir eru í gongd í ár og kunnu væntast í 2010. Hetta skuldi givið arbeiði til stórar fyritøkur í vinnuni, og konjunkturbarometrið bendir á, at byggivinnan

hevur tryggjað arbeiði einar tríggjar ársfjórðingar fram. Tó kunnu føroysku fyritøkurnar í einstøkum førum hava ringt við at standa seg í kappingini við útlendskar fyritøkur, tá bjóðað verður upp á stórar verkætlanir, og kemur hetta væntandi at kroysta føroysku fyritøkurnar nakað. Útlit eru fyri, at tað verða færri og tí kanska størri byggifyritøkur hereftir, m.a. tí at ábendingar eru um, at byggifyritøkur kunnu fara á húsagang, so sum støðan er vorðin.

Verkætlanarstýringin í vinnuni hevur ikki verið góð seinastu árini. So mikið nógv av virksemi hevur verið, at nógvar smáar fyritøkur hava eisini havt um hendi stórar verkætlanir. Hetta hevur gjørt, at stýringin og virkisførið í vinnuni hava ikki verið góð. Virkisførið í byggivinnuni kann tí fara at batna næstu árini, verða byggifyritøkurnar størri við neyðugum umsitingarførleika.

### 2.8.3 Handils- og tænastuvinnurnar

Hesar vinnur eru nógv tengdar at innlendis eftirspurningi. Tískil er væntandi, at hesar vinnur fara at merkja eina ávísa afturgongd av minni eftirspurningi sum heild í 2009 enn í 2008, men ein støðuleiki er kanska væntandi í 2010. Sambært konjunkturbarometrinum er handilsvinnan svartskygd um útlitini, og tykist ikki at hóma ein glotta fyri framman. Hetta kundi bent á, at fleiri fyritøkur hava tungan rakstur, og at størri íløguhugur ikki kann væntast í bræði.

Indikatorar fyri handil og tænastuvinnur, jan-03 til aug-09 MYND 14




Kelda: Hagstova Føroya

## 3. BÚSKAPARSTØÐAN OG AVBJÓÐINGIN Í LØTUNI

Uppgongdin í 2006 og 2007 og almenni leikluturin Viðgerðin omanfyri av konjunkturviðurskiftunum vísir m.a., at búskaparliga uppgongdin árini 2006 og 2007 (samanlagdur BTÚ-vøkstur á 19,4% í leypandi prísum) var óvanliga stór. Umframt, at alivinnan kom fyri seg aftur hesi árini, so stavaði vøksturin í størri mun frá betri fíggingartreytum og -møguleikum til vinnu og húsarhald frá føroysku fíggjarstovnunum. Hetta hevði síðan m.a. við sær, at húsarhaldsnýtslan gjørdist óvanliga stór, umframt at byggivirksemið vaks munandi. Men samstundis sum hesar marknaðartreytaðu ávirkanirnar gjørdu um seg um hetta mundið, hækkaði almenni geirin nýtsluna og íløgurnar nógv.

Afturgongdin Altjóða fíggjar- og búskaparkreppan er høvuðsorsøkin til, at føroyski búskapurin síðan hevur verið fyri realari búskaparligari afturgongd í 2008 og 2009, men beinleiðis ávirkanirnar hava ikki verið eins stórar á føroyska fíggjargeiran og búskapin í síni heild samanborið við flest allar búskapir í vesturheiminum. Tískil skal afturgongdin eisini síggjast sum ein náturlig tillaging av nøkrum óvanligum tíðaravmarkaðum, marknaðartreytaðum viðurskiftum í uppgongdini í 2006 og 2007, m.a. eru umstøðurnar hjá fíggjarstovnum broyttar, trýstið á byggivirksemið er slakað, vøksturin í alivinnuni hevur verið avmarkaður og er nú komin á eitt kapasitetsmark. Harumframt líkist nýtslu-atferðin hjá húsarhaldum vanligum stigi, tó møguliga minni enn vanligt, og hóast vaksandi arbeiðsloysi í eini tillagingartíð, verður ikki roknað við stórum arbeiðsloysi. Handilsjavnin javnvigar næstan og gjaldsjavnin vísir harvið ivaleyst stórt avlop.

... og leikturin hjá tí almenna Í realu búskaparligu afturgongdini í 2008 og 2009 hevur almenni geirin virkað framhaldandi stimbrandi, tó minni stimbrandi borin saman við uppgongdina 2006 og 2007, og landskassin við einum halli, nærum 800 mió. kr. í 2010, virkar eisini viðvirkandi til at halda hjólini gangandi.

Avbjóðingin í løtuni Fyri landskassan merkir hetta tó, at hallið til samans á fíggjarlógini árini 2008, 2009 og 2010 er næstan 2 mia. kr., og samanborið við onnur lond vísa lyklatøl fyri almenna geiran eina óhepna gongd.

Indeks fyri útgoldnar lønir í almenna og privata geira — MYND 15




Kelda: Hagstova Føroya (FO fyri 2000-2006), Landsbanki Føroya (FO fyri 2007-2010) og Danmarks Statistik

Ein samanbering við m.a. donsk viðurskifti árini 2000 til 2010, gevur greiða ábending um eina gongd innan almenna geiran í Føroyum, sum krevur serligt ansni og greining, sí mynd

15[3]. Myndin vísir, at síðan 2000 eru lønarútgjaldingarnar í almenna geiranum øktar uml. 80%, samstundis sum lønir til annað framleiðandi virksemi bæði í Føroyum og Danmark fylgja gongdini í tøku bruttotjóðarinntøkuni. Borið saman við gongdina í Danmark er sostatt greitt ósamsvar millum gongdina í almennu lønarútreiðslunum í Føroyum og stóran part av skattagrundarlagnum, ið skal til at fíggja vøksturin.

tBTI býtt á nýtslu og bruttosparing (= innlendis íløgur + rakstrarjavni gjaldsjavnans) MYND 16




Kelda: Hagstova Føroya (uppgerð 2000 til 2006) og Landsbanki Føroya (meting 2007 til 2010)

Mynd 16 vísir gongdina í nýtslu og bruttosparingini og ábendingin er somuleiðis rímiliga greið: almenni geirin er tíðarskeiðið 2000 til 2010 øktur lufalsliga nógv[4], samstundis sum privatu íløgurnar seinru árini eru vorðnar lutfalsliga minni partur av tøku bruttotjóðarinntøkuni.

Spurningurin er tí, um vaksin skuld á nærum 2 mia. kr. fyri føroyska landskassan er prísurin av altjóða fíggjar- og búskaparkreppuni og/ella av óhepnum fíggjarpolitikki seinru árini.

Svarið er ivaleyst ein samanrenning av báðum, men fyri landskassan er avbjóðingin at skapa betri samsvar millum inntøkur og útreiðslur, soleiðis at fíggjarpolitikkurin gerst haldførur.

[3] Búskaparráðið hevur hesaferð ikki havt orku og stundir til neyvari at greina almenna geiran, men loyvir sær tó at halda seg til ábendingar yvirskipað.

[4] Gongdin kann partvís hava sína orsøk í lønarafturbering til almenna geiran eftir kreppuna í '90-unum, tó vil sama argument í ávísan mun eisini kunna brúkast mótvegis øðrum framleiðani virksemi, tískil verður ikki mett, at lønarafturbering er týðandi partur av gongdini í almenna geiranum.

# 4. FÍGGJARPOLITISKAR MEGINREGLUR

Búskaparráðið hevur áður viðgjørt fíggjarpolitikk[5] og fer hesa ferð ikki at hava langa viðgerð av fíggjarpolitikki eftir einum teoretiskum sjónarmiði, men fer heldur í stuttum at lýsa nøkur av høvuðsatlitunum, ið mælt verður til at fylgja hjá politisku skipanini, tá ið fíggjarpolitiskar avgerðir verða tiknar.

## 4.1 FÍGGJARPOLITIKKUR SKAL VERA HALDFØRUR

Ein fortreyt fyri jøvnum búskaparvøkstri er, at fíggjarpolitikkurin hjá tí almenna er haldførur.

Skyldur At fíggjarpolitikkurin hjá tí almenna er haldførur merkir, at tað almenna yvir eitt miðallangt tíðarskeið og við verandi skatta- og útreiðslupolitikki er ført fyri at røkja sínar skyldur og rinda rentur og avdráttir av útistandandi skuld.

Borgarans álit Fáa húsarhald ta fatan, at almennar útreiðslur eru størri enn inntøkurnar, sæð yvir eitt miðallangt tíðarskeið, kunnu tey missa álitið á førda skatta- og útreiðslupolitikkinum. Ein háttur hjá húsarhaldum at byrgja upp fyri broytingum í skattatrýstinum ella at fíggingarkostnaðurin hjá tí almenna hækkar í framtíðini er at vaksa uppsparingina.

*Meginreglan fyri fíggjarpolitikk eigur at vera, at almennar inntøkur og útreiðslur javnviga yvir langt áramál, soleiðis at førdi skatta- og útreiðslupolitikkurin er haldførur*

"Symmetriskur" fíggjarpolitikkur Avgerandi fortreyt fyri at føra virknan fíggjarpolitikk er, at tað politiskt er gjørligt at føra tálmandi fíggjarpolitikk í góðum tíðum. Hetta hevur seinru árini víst seg at vera ógvuliga trupult bæði í Føroyum og aðrastaðni. Tvørturímóti er tað øvugta hent; førdi fíggjarpolitikkurin hevur stimbrað búskapin við skattalættum og stórum útreiðsluvøkstri, samstundis sum onnur viðurskifti, sum fíggjarpolitikkurin ikki ávirkar, hava virkað stimbrandi á búskaparvøksturin.

Ráðini eru tískil, at fíggjarpolitikkur eigur at vera "symmetriskur"; t.e. fíggjarpolitikkurin eigur at virka eins tálmandi á eftirspurningin í góðum tíðum og hann virkar stimbrandi á eftirspurningin í verri tíðum.

Hvørji fíggjarpolitisk amboð hevur politiska skipanin? Politiska skipanin hevur inntøku- og útreiðslusíðuna hjá tí almenna at føra fíggjarpolitikk við. Skal tað almenna føra virknan fíggjarpolitikk, skal tað verða við at broyta inntøkur, rakstrarútreiðslur, inntøkuveitingar ella almennu íløgurnar.

Almenna nýtslan Almenna nýtslan eigur tó ikki at verða nýtt sum amboð at stýra konjunkturgongdini við. Verður almenna nýtslan t.d. hækkað í eini konjunkturniðurgongd

[5] Sí [5].

til tess at stimbra búskapin við eftirspurningi frá almenna geiranum, er sera trupult at lækka almennu nýtsluna aftur í eini konjunkturuppgongd. Hetta er brot á meginregluna omanfyri, ið vísir á, at almenni fíggjarpolitikkurin eigur at vera “symmetriskur” í konjunkturniðurgongd og í konjunkturuppgongd.

Stigið á almennu nýtsluni (stovnsrakstrinum) eigur ikki at verða sett við atliti til støðuna eitt einstakt fíggjarár. Almenna nýtslan eigur at verða støðug og løgd fyri eitt longri áramál við atliti til almenna inntøkustigið og eftir, hvat vælferðarsamfelag vit ynskja og hava ráð til.

Broytingar í almennu nýtsluni hava tí lyndi at vera varandi og hóska seg tí ikki væl sum stýriamboð til virknan fíggjarpolitikk.

> *Almenna nýtslan, t.e. almennu rakstrarútreiðslurnar, eiga ikki at verða nýttar sum fíggjarpolitiskt stýriamboð, við tað at tær hava lyndi at vera varandi í búskapinum. Heldur eiga almennar íløgur ella skattainntøkurnar at verða nýttar sum fíggjarpolitiskt stýriamboð, men einans í serligum førum og undir skipaðum viðurskiftum*

Almennar skattainntøkur og veitingarútreiðslur Í summum førum kunnu skattainntøkurnar saman við inntøkuveitingum hjá tí almenna nýtast sum stýriamboð til virknan konjunkturpolitikk. Í samsvari við meginregluna um “symmetriskan” fíggjarpolitikk krevur hetta tó, at skattahækkingar verða nýttar í konjunkturuppgongd. Royndirnar úr Føroyum og aðrastaðni eru, at hetta er sera trupult at seta í verk politiskt.

At framskunda íløgur kann nýtast í summum førum Tá ið almennar íløgur verða nýttar sum stýriamboð er umráðandi, at hetta fevnir um at framskunda *ætlaðar* almennar íløgur, t.e. at tað almenna av sær sjálvum táttar í eftirspurningin seinri, við tað at tað almenna hevur færri íløgur at gera tá. Hetta krevur, at tað almenna hevur eina greiða langtíðarætlan fyri allar almennar íløgur.[6]

> *Ráðini eru, at almennar íløgur verða raðfestar við atliti til framleiðsluevnini hjá búskapinum í framtíðini og eftir hvørjar íløgur geva størsta samfelagsliga íkastið, sæð yvir eitt longri áramál*

Konjunkturpolitisk tiltøk av ikki-varandi slag Í samsvari við meginregluna omanfyri er umráðandi, at fíggjarpolitisk tiltøk at stýra konjunkturum við eru av ikki-varandi slag, t.e. at tað almenna tálmar eftirspurninginum í eini konjunkturuppgongd eins væl og at tað almenna stimbrar eftirspurninginum í eini konjunkturniðurgongd.

[6] Sí eisini brot 6.2 um at raðfesta íløgur.

## 4.2 VIRKIN FÍGGJARPOLITIKKUR EINANS Í SERLIGUM FØRUM

Sjálvirkandi útjavnarar Fíggjarpolitikkur eigur í stórst møguligan mun at verða avmarkaður til at lata sjálvvirkandi útjavnarar (”automatiskar stabilisatorar”) stimbra búskapin í verri tíðum og tálma búskapin í betri tíðum. Sjálvvirkandi útjavniningin merkir m.a., at arbeiðsloysisstuðul veksur av sær sjálvum í verri tíðum, og at m.a. skattainntøkurnar minka av sær sjálvum. Tað øvugta hendir í betri tíðum.

Ótrygt grundarlag til støðutakan Hagtøl um búskapin í Føroyum eins og alla aðrastaðni eru av slíkum slag, at tað er ógvuliga torført at neyvstilla búskapin við virknum fíggjarpolitikki. Hagtølini eru seinkað í mun til veruligu gongdina og somuleiðis mangan ikki serliga neyv. Tí er ógjørligt at vita við vissu, í hvussu stóran mun tað almenna eigur at stimbra ella tálma búskapin.

*Virkin fíggjarpolitikkur eigur bara verða nýttur í serligum førum, har ið sera lítil ella eingin ivi er um, hvørjar ábendingar hagtøl um búskapin geva*

Politiska viðgerðin og seinking Harafturat virkar fíggjarpolitikkurin við seinking, við tað at semjur skulu fáast politiskt, hvørji tiltøk skulu verða sett í verk; síðan skulu tiltøkini samtykkjast og verða sett í verk, áðrenn tey at enda ávirka búskapin. Vandin er tí, at virkin fíggjarpolitikkur ger beinleiðis skaða og virkar øvugt eftir tí, ið ætlað var. Partar av búskapinum kunnu lættliga verða stimbraðir ov nógv soleiðis, at lønarlagið hækkar í øllum búskapinum, kappingarførið versnar, og trýst kemur á handils- og gjaldsjavna.

Stoytir á útboð og eftirspurning Búskapir verða raktir av stoytum á eftirspurningin og á útboðið. Í teimum førum, har konjunkturniðurgongd er orsakað av stoytum á eftirspurningin kann í summum førum vera skilagott hjá tí almenna at stimbra búskapin við almennum eftirspurningi.

Ikki er skilagott at stimbra búskapin við eftirspurningi frá tí almenna í teimum førum, har stoytir hava verið á útboðið í búskapinum.[7] Úrslitið verður tá prísvøkstur, kapasitetstrýst, versnandi kappingarføri og trýst á handils- og gjaldsjavna. Negativir stoytir á útboðið hava ta ávirkan, at framleiðsluevnini hjá búskapinum eru minkað við tí tilfeingi, sum er tøkt.

Sostatt er tað ikki í øllum førum skilagott hjá tí almenna at stimbra búskapin við fíggjarpolitikki, hóast búskapurin framleiðir undir sokallaða kapasitetsmarkið.

*Ráðini eru, at tað almenna eigur at halda seg frá at føra virknan fíggjarpolitikk*

Undir øllum umstøðum eiga fylgjandi treytir vera hildnar, áðrenn tað er skilagott við virknum fíggjarpolitikki:

---

[7] Høgir oljuprísir eru t.d. fyri føroyska búskapin ein negativur stoytur á útboðið, við tað at framleiðslukostnaðurin hjá vinnuni økist av hægri oljuprísum.

- Tað skal vera tøkur kapasitetur í búskapinum; t.d. tøk arbeiðsmegi, t.e. virkin fíggjarpolitikkur er ikki skilagóður við ógvuliga lágum arbeiðsloysi

- Virkin fíggjarpolitikkur skal vera av ikki-varandi slagi. T.e. fíggjarpolitikkurin eigur at vera "symmetriskur"

- Lítil ella eingin ivi skal vera um, hvørjar ábendingar hagtølini geva. T.d. er bara skilagott at føra virknan fíggjarpolitikk, soleiðis sum vissa er fyri, at stoytirnir á búskapin hava ávirkað eftirspurningin í búskapinum

At hava búskapar- og fíggjarpolitiskt rásarúm er tó avgerandi fortreyt fyri at føra virknan fíggjarpolitikk.

## 4.3 STREMBAN EFTIR BÚSKAPAR- OG FÍGGJARLIGUM RÁSARÚMI

Politiska skipanin eigur at tryggja, at neyðugt rásarúm er í búskapinum fyri tí politikki, sum ætlanin er at føra. Búskaparligt rásarúm kann vera:

- Realbúskaparligt rásarúm, sum er at virksemið svarar til arbeiðsorku og kapasitetútnytting

- Fíggjarligt og fíggingarligt rásarúm, sum er at javnvág kann fáast millum inntøkur og útreiðslur sum frálíður, og at neyðugt hall kann fíggjast við lántøku fyri sámuligar treytir

Fyri at fáa haldføran fíggjarpolitikk at virka eigur politiska skipanin at hava fyrilit fyri, hvussu búskaparliga rásarúmið verður ávirkað sum frálíður. Hetta er galdandi fyri bæði tað realbúskaparliga rásarúmið fyri búskapin sum heild, og fyri tað fíggjarliga og fíggingarliga rásarúmið hjá myndugleikunum sjálvum.

Inntøkupolitikkurin og partar av útreiðslupolitikkinum (serstakliga inntøkuveitingar) kunnu og eiga eisini at verða brúktir til at ávirka realbúskaparliga rásarúmið og tað fíggjarliga rásarúmið hjá myndugleikunum.

Íløgupolitikkurin eigur at verða lagaður eftir tí rásarúmi, sum politikkurin annars hevur skapt. Royndir aðrastaðni[8] vísa, at tá táttast skal í fíggjarpolitikkin, vera íløgurnar minkaðar. Tað er tí eisini umráðandi at skapa rásarúm fyri neyðugum íløgum og at hava tíðarætlan fyri nær íløgurnar skulu gerast.

Fyri Føroyar er tað eisini týdningarmikið, at talan er um ógvuliga lítlan tilfeingisbúskap við stórum sveiggjum.

*Lánførleikin (kreditvirðið) hjá tí almenna er meira ávirkiligur enn hjá stórum londum. Tað er tí alneyðugt at hava greiðar og eftirfarandi ætlanir fyri at skapa tað neyðuga rásarúmið í búskapinum og hjá myndugleikunum*

[8] Sí [12, s. 26].

# 5. FÍGGJARPOLITIKKURIN HJÁ TÍ ALMENNA

Hesin parturin av frágreiðingini viðger førda fíggjarpolitikkin hjá tí almenna. Mett verður um, hvussu nógv hallið hjá tí almenna kemst av skeivum politikki undanfarin ár ella av konjunkturniðurgongd í búskapinum.

## 5.1 FØRDI FÍGGJARPOLITIKKURIN HALDFØRUR?

Almenni fíggjarpolitikkurin hevur stimbrað búskapin undir seinastu konjunkturuppgongd. Vøksturin í rakstrarútreiðslum hevur verið stórur eftir kreppuna í 90-árunum, men inntøkurnar hjá landskassanum eru ikki vaksnar líka nógv og eru lækkaðar í 2008 og 2009.

Talvurnar 2 og 3 vísa nøkur høvuðstøl úr roknskapinum hjá landskassanum seinastu árini. Á talvunum sæst, at hallið hjá landskassanum í 2010 er góðar 770 mió. kr. og svarar til knøpp 20% av inntøkunum.

Inntøkur Landskassans TALVA 2

| *%-býti og mió DKK (netto)* | 2007 | | 2008 | | 2009 | | 2010 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Skattainntøkur | 43% | 1.791 | 44% | 1.829 | 44% | 1.696 | 43% | 1.688 |
| Avgjaldsinntøkur | 41% | 1.722 | 39% | 1.629 | 40% | 1.539 | 40% | 1.569 |
| Ymsar inntøkur | 1% | 45 | 1% | 44 | 1% | 25 | 1% | 25 |
| Heildarveiting o.t. | 15% | 632 | 15% | 635 | 16% | 635 | 16% | 635 |
| Tilsamans | 100% | 4.190 | 100% | 4.137 | 100% | 3.895 | 100% | 3.917 |

Viðm: Tølini fyri 2009 eru játtan. Tølini fyri 2010 eru úr fíggjarlóg fyri 2010
Kelda: Gjaldstovan og Fíggjarmálaráðið

Myndirnar 17 til 19 vísa gongdina í inntøkum og útreiðslum hjá landskassanum seinastu árini. Á myndunum sæst stóri útreiðsluvøksturin, samstundis sum inntøkurnar ikki eru vaksnar samsvarandi.

Útreiðslur Landskassans TALVA 3

| *%-býti og mió DKK (netto)* | 2007 | | 2008 | | 2009 | | 2010 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 93% | 3.767 | 95% | 4.251 | 95% | 4.404 | 92% | 4.326 |
| Løguútreiðslur | 7% | 292 | 5% | 232 | 5% | 227 | 7% | 317 |
| Rentuútreiðslur | 0% | -14 | 0% | -16 | 0% | 4 | 1% | 42 |
| Tilsamans | 100% | 4.045 | 100% | 4.467 | 100% | 4.635 | 100% | 4.685 |
| RLÚ-avlop | | 145 | | -330 | | -740 | | -768 |

Viðm: Tølini fyri 2009 eru játtan. Tølini fyri 2010 eru úr fíggjarlóg fyri 2010
Kelda: Gjaldstovan og Fíggjarmálaráðið

Útreiðsluvøksturin hjá tí almenna skal síggjast í ljósinum av, at føroyski búskapurin hevur verið í einum longum og støðugum hákonjunkturi eftir kreppuna í 90'unum.

Gongdin í inntøkum, útreiðslum og avlopinum hjá Landskassanum, 1997–2010 MYND 17




Viðm: 2009 og 2010 eru fíggjarætlanartøl
Kelda: Fíggjarmálaráðið

Nøkur høvuðssløg av útreiðslum hjá landinum, 1997–2010 MYND 18




Kelda: Landsroknskapurin og fíggjarlógin fyri 2010

Haraftrat eru skattalættar latnir, sum hava vaksið um tøku inntøkuna hjá húsarhaldunum og gjørt konjunkturuppgongdina størri, enn hon annars hevði verið. Skattalættarnir síggjast aftur í mynd 21, ið vísir, at vanligur landsskattur, persónsskatturin, at kalla ikki er vaksin frá 2002, hóast stóran vøkstur í BTÚ. Skattalættarnir frá 2004-2008 vóru stórir, út við 100 mió. kr. hvørt ár. Ítøkiliga merkti skattalættin, at broytingar vórðu gjørdar í landsskattastiganum á tann hátt, at skattastiga-mørkini vórðu hækkað og skatta-prosentið fyri ymisk skattamørk vórðu leypandi lækkað árini 2004-2008.

Nøkur høvuðssløg av inntøkum hjá landinum, 1997–2010 MYND 19




Kelda: Landsroknskapurin og fíggjarlógin fyri 2010

Inngjøldini í AMEG-grunnin vórðu hækkað frá 2005 til 2008 úr 0,75% upp í 1,75% av skattskyldugu inntøkuni. Útgjøldini úr AMEG hækkaðu tó eisini, soleiðis at nettoávirkanin av hesum á búskapin var lítil. Ítøkiliga hækkaðu inngjøldini í AMEG-grunnin úr góðum 100 mió. kr. upp í góðar 240 mió. kr. frá 2005 til 2008, men útgjøldini hækkaðu úr góðum 60 mió. kr. upp í góðar 160 mió. kr. sama tíðarskeið.

Skattalættarnir vóru munandi størri og høvdu munandi meira stimbrandi ávirkan á búskapin. Inngjøldini í Barsilsgrunnin vórðu somuleiðis hækkað úr góðum 30 mió. kr. í 2005 upp í góðar 80 mió. kr. í 2006. Eisini henda broyting er lítil afturímóti stimbranini av skattalættunum 2004-2008.

Skattalættarnir árini 2004-2008 minkaðu inntøkurnar hjá landskassanum og gjørdu, at landskassin hevur minni uppsparing at standa ímóti við í eini broyttari konjunkturstøðu. Tá ið inntøkurnar hjá tí almenna verða skerdar við skattalættum og við at minka flytingarinntøkur úr Danmark, mugu útreiðslurnar hjá tí almenna tillagast til hesa nýggju støðu. Hetta er ikki gjørt seinastu árini.

### 5.1.1 Ábendingar um bygnaðarligt hall

Konjunkturelt hall Mynd 20 vísir avlopið hjá almenna geiranum í Føroyum. Ein partur av hallinum hjá tí almenna er, av tí at konjunkturniðurgongd er í búskapinum. Hetta er konjunkturella hallið, ella tað sum er av tí, at húsarhald og vinnan rinda minni í skatti og avgjøldum nú enn áður, við tað at minni virksemi er í samfelagnum. Hin parturin av hallinum er av bygnaðarligum slagi og stavar frá, at skattainntøkurnar hjá tí almenna í miðal eru ov lágar bornar saman við útreiðslurnar.

Avlop tilsamans hjá landi, kommunum, ALS og AMEG, 2002–2010 MYND 20




Viðm: 2009 er fíggjarætlanartøl. 2010 er fíggjarætlanartøl og metingar
Kelda: Fíggjarmálaráðið

Ikki-varandi inntøkur burtur Í mynd 21 niðanfyri sæst (saman við mynd 16), at vøksturin í inntøkum hjá landskassanum seinastu árini stavar frá avgjaldsinntøkum, sum nú eru minkaðar munandi. Vøksturin í avgjaldsinntøkunum árini 2006-2007 er at meta sum ein ikki-varandi inntøka av kredittfíggjaðum nýtsluvøkstri tey árini. Tað er lítið sannlíkt, at henda inntøkukeldan verður varandi frameftir. Harafturat eru fleiri eingangsinntøkur falnar til landskassan, við tað at almennar fyritøkur eru einskildar seinastu árini.

Gongdin í persónsskatta- og avgjaldsinntøkum landskassans MYND 21




Kelda: Landsroknskapurin og fíggjarlógin fyri 2010

Almennur útreiðsluvøkstur Ábendingin um bygnaðarligt hall verður í høvuðsheitum bygd á ymisk hagtøl yvir gongdina í útreiðslum og inntøkugrundarlagnum yvir tíðarskeiðið 1998 og frameftir og samanhildið við avlop í almenna geiranum[9]. Í broti 3 varð m.a. víst á, at almennu lønarútreiðslurnar síðan 2000 eru hækkaðar uml. 80%, samstundis sum lønir annars, t.e. allar aðrar lønarútreiðslur, ið ikki eru partur av almenna geiranum, eru hækkaðar uml. 35%. Mynd 22 vísir allar almennu útreiðslurnar, t.e. almenn nýtsla og

[9]Hagtølini stava frá tjóðarroknskaparuppgerð hjá Hagstovu Føroya, ið ikki gongur longur aftur enn til 1998.

almennar íløgur hjá Føroyum, samanborið við grannalond. Smb. hesum tølum, so eru allar almennu útreiðslurnar bornar saman við tøku bruttotjóðarinntøkuna hækkaðar úr hóvligum grundarlagi bornar saman við grannalond, uml. 25% í 1998 upp í 34% í 2006 (tølini fyri 2006 eru uppgjørd tjóðarroknskapartøl), og meting fyri almennu útreiðslurnar síðan 2006 vísir, at tær eru hækkaðar 39% av tøku bruttotjóðarinntøkuni í 2010. Hetta merkir í stuttum, at kostnaðurin at veita almennar tænastur í Føroyum er meira enn tvífaldaður, og inntøkugrundarlagið, ið partvís fíggjar henda vøkstur, er viknað lutfalsliga.

Almennar útreiðslur ímt tBTI — MYND 22




Viðm: Eingin uppgerð yvir tBTI finst fyri grannalondini í 2010
Kelda: Hagstova Føroya (uppgerð 1998, 2002 og 2006), Landsbanki Føroya (meting 2010) og OECD fyri grannalond

**Inntøkugrundarlagi viknað** Inntøkugrundarlagið er í høvuðsheitum tann samlaða inntøkan, sum føroyski búskapurin megnar at fáa til vega við innlendis framleiðslu og øðrum flytingum millum Føroyar og útlond, t.v.s. tøka bruttotjóðarinntøkan. Ítøkiliga stavar høvuðsparturin av inntøkunum til almenna geiran frá persóns- og felagsskatti, umframt meirvirðisgjaldi. Við skattalættum árini 2004 til 2008 hevur landið gjørt inntøkugrundarlagi veikari enn tað annars vildi verið.

**Bygnaðarligt úrslit** Í framkomnum londum verður fíggjarpolitiskt mát sett upp, ið lýsir støðuna hjá almenna geiranum, har hædd verður tikin fyri lág- ella hákonjunkturi. Hugtak, sum nýtt verður í hesum sambandi er *bygnaðarligt úrslit*, *bygnaðarligt yvirskot* ella *bygnaðarligt hall* hjá almenna geiranum (á enskum structural balance). Úrslitið hjá tí almenna, sum lýst verður við hesum mátinum, er eitt gott boð uppá, um fíggjarpolitisk inntriv eiga at verða framd ella ikki.

**Noreg hevur bygnaðarligt hall** Hyggja vit í mynd 23 til dømis at Noreg, er sera stórt yvirskot í 2006 hjá tí almenna, svarandi 18,5% av BTÚ. Við hesum skuldi ein hildið, at neyðugt var ikki hjá Noregi at tillaga almenna geiran samanborið við búskapin annars. Men tá ið hetta roknskaparliga úrslitið verður konjunktur-reinsað, er úrslitið vent til undirskot, svarandi til 2,6% av BTÚ í 2006. Bygnaðarliga hallið fyri komandi ár verður mett at vera 5,4% av BTÚ. Hesi bygnaðarligu úrslitini vísa, at Noreg stendur fyri stórum fíggjarpolitiskum avbjóðingum.

**... samstundis sum Danmark hevur bygnaðarligt yvirskot** Mynd 23 vísir, at almenni geirin í Danmark í 2010 fær roknskaparligt hall svarandi til 3,5% av BTÚ. Hetta hallið stavar ikki bert frá konjunkturstøðuni, men eisini frá tilætlaðum tiltøkum hjá stjórnini, sum hava til endamáls at økja virksemið í landinum. Samstundis sæst, at roknað verður framvegis við bygnaðarligum yvirskoti hjá tí almenna svarandi til 1,3% av BTÚ. Hetta

bygnaðarliga yvirskotið í 2010 er tekin um, at danski fíggjarpolitikkurin er haldførur, tí undirskotið verður burtur, tá ið búskapargongdin vendir.

Konjunkturel og bygnaðarlig avlop í almenna geiranum í grannalondum MYND 23




Viðm: Eingin strukturel saldo er tøk fyri Ísland og Føroyar, ið vísir bygnaðarligt avlop
Kelda: Hagstova Føroya (uppgerð 1998, 2002 og 2006), Landsbanki Føroya (meting 2010) og IMF fyri grannalond

Hugsað dømi fyri bygnaðarligt úrslit í Føroyum Tøl fyri Føroyar viðvíkjandi bygnaðarligum úrsliti eru, sum áður nevnt, ikki tøk. Vit kunnu tó gera leysliga roynd at meta um bygnaðarliga úrslitið fyri 2006, grundað á munin millum roknskaparligu úrslitini og bygnaðarligu úrslitini hjá grannalondum okkara. Fyri Noreg er hesin munur í 2006 góð 22%-stig og fyri Danmark er hann 2,5%-stig. Vit velja í hesum dømi at rokna við einum muni á 3%-stig fyri Føroyar í 2006. Tá er talan um bygnaðarligt hall á 1% av BTÚ í 2006.

Vit kunnu afturat hesum leysliga rokna við, at skattalættar og stórur útreiðsluvøkstur í 2007-2009 hava økt bygnaðarliga hallið, soleiðis at hetta hallið í 2010 kann hugsast at liggja um 3% av BTÚ.

Er hetta samsvarandi veruleikanum – sum vit ikki vita, áður enn neyvari kanningar eru gjørdar – er talan um bygnaðarligt hall svarandi til uml. 350 mió kr. Við øðrum orðum eigur politiska kervið eftir hesum at tátta í fíggjarpolitiskt svarandi til hesa upphædd.

*Tekin eru um, at førdi fíggjarpolitikkurin hjá tí almenna hevur innbygdar skeivleikar, ið geva bygnaðarligt hall*

### 5.1.2 Skattatrýstið

Politiska avgerðin um, hvussu høgt skattatrýstið skal vera í einum landi, er í veruleikanum einføld. Avgerðin er at velja eitt hóskandi tænastustig í almenna geiranum, t.e. eina hóskandi støðd á almenna geiranum sum partur av øllum búskapinum, BTÚ, og at seta skattatrýstið soleiðis, at tað tryggjar, at almennar inntøkur og útreiðslur javnviga eitt langt áramál.

Verður gjørt av politiskt at hava lægri skattatrýst í Føroyum enn í grannalondunum, er ein avleiðing av hesum, at almenna tænastustigið eisini verður lægri enn í grannalondunum, við tað at tað almenna ikki fær fíggjað eitt tænastustig líka gott sum tað í grannalondunum. Verður harafturímóti gjørt av at hava á leið sama almenna tænastustig í

Føroyum sum í grannalondunum, er eisini neyðugt, at tað almenna hevur á leið somu skatta- og avgjaldsinntøkur sum í grannalondunum.

| Skattatrýst | | | | | TALVA 4 |
|---|---|---|---|---|---|
| *% av BTÚ* | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
| Ísland | 38% | 41% | 42% | ei tøkt | ei tøkt |
| Danmark | 50% | 52% | 50% | 49% | 49% |
| Noreg | 43% | 44% | 44% | 44% | 42% |
| Svøríki | 48% | 49% | 49% | 48% | 47% |
| Finnland | 43% | 44% | 43% | ei tøkt | ei tøkt |
| Føroyar | 45% | 45% | 47% | ei tøkt | ei tøkt |

Kelda: Hagstova Føroya, OECD, Danmarks Statistik

Talva 4 vísir skattatrýstið í Føroyum og í grannalondunum gjørt upp eftir tjóðarroknskapinum. Talva 4 vísir, at skattatrýstið í Føroyum kann sammetast við skattatrýstið í flestu grannalondunum, tó tað er nakað lægri enn í Danmark og Svøríki.

Neyðugt er at lesa talvu 4 við fyrivarni fyri ymsum viðurskiftum. Eingin eintýddur háttur er at máta skattatrýst; tí er munur á uppgerðum alt eftir hvør uppgerðarháttur verður nýttur. Skattaskipanin er ymisk frá landi til land, og hetta ávirkar, hvussu nógva skattainntøku tað almenna hevur. Tískil skal ein vera varin við at bera saman skattatrýstið millum lond. T.d. ávirkast skattatrýstið av, hvørt nógvir frádráttir eru í skattaskipanini, hvørt almennar veitingar eru lágar og skattafríar, ella høgar men skattskyldugar[10].

*Tekin eru um, at skattatrýstið er lægri í Føroyum samanborið við Danmark og Svøríki, men hægri samanborið við Noreg og Finnland*

## 5.2 ER TALAN UM SERLIGT FØRI?

Sum víst á í broti 4.2, verður mælt frá at føra virknan fíggjarpolitikk, uttan tó í serligum førum, og víst verður á fortreytir, ið skulu verða til staðar. Fyri at svara spurninginum um verandi støða í føroyska búskapinum er eitt serligt føri, verður neyðugt at hyggja at búskaparstøðuni borið saman við langtíðarindikatorar, men samstundis eftir, hvar búskapurin er staddur borin saman við ávíkavist undanfarin og komandi ár.

Konjunkturmetingin frammanfyri gevur greiða ábending um, at føroyski búskapurin sum heild ikki er illa fyri. Smb. Hagstovuni høvdu Føroyar nettoogn í 2006, sum var 3,7 mia. kr. og tekin eru um, at Føroyar hava havt avlop á gjaldsjavnanum síðan tá. Fíggjarstøðan afturímóti útlondum má tí sigast at vera góð. Føroysku húsarhaldini tykjast vera hampiliga væl fyri í altjóða sammeting, og landið og kommunur høvdu lítla nettoskuld til samans um árslok 2008. Fíggjarstovnar og vinnufyritøkur eiga bróðurpartin av nettoognini í útlondum. Partar av virkseminum í tilfeingisvinnum hava rakstrartrupulleikar. Byggivinan merkir ógvisliga afturgongd. Handils- og tænastuvinnurnar hava merkt sviðan av størri varsemi hjá vinnu og húsarhaldum. Við arbeiðsloysi, sum er góð 4% av arbeiðsfjøldini, er búskapurin framhaldandi tætt við markið fyri, hvat hann kann framleiða, og niðurstøðan er, at hóast føroyski búskapurin framvegis er merktur av altjóða fíggjar- og

[10] Mátið fyri skattatrýst víst í talvu 4, og ymisk fyrivarni eru gjøllari lýst í [20, broti 7.2] og í [7].

búskaparkreppuni, eru útlit sum heild fyri støðugari viðurskiftum í 2010. Størsti trupulleikin er stýringin viðvíkjandi landi og kommunum.

*Føroyski búskapurin hevur í stóran mun verið í undantaksstøðu í búskaparligu uppgongdini árini 2005, 2006 og 2007, og hóast reala afturgongd í 2008 og 2009, eru útlit til støðugari búskaparlig viðurskifti í 2010*

Tað almenna hevur seinru árini virkað stimbrandi á føroyska búskapin og verður tað somuleiðis smb. fíggjarlógaruppskotinum fyri 2010.

Havandi í huga fíggjarstøðuna og hallið hjá tí almenna í Føroyum, er ikki ráðiligt at føra stimbrandi fíggjarpolitikk við enn størri halli hjá tí almenna. Fíggjarligt rásarúm er neyvan til staðar at føra meira stimbrandi fíggjarpolitikk. Hallið hjá tí almenna skal síggjast í tí, at rokningin verður at rinda aftur seinri við avlopum hjá tí almenna í framtíðini.

Altjóða fíggjarmarknaðirnir hava verið gjøgnum eitt langt tíðarskeið, har tað lættliga hevur borið til hjá stjórnum at fíggja skuld fyri lagaligan kostnað. Tað er tó ikki vist, at tílík støða fer at verða varandi hereftir.

Ein avleiðing av fíggjarkreppuni kann gerast, at munurin á fíggingarkostnaðinum millum lond við góðum og minni góðum kredittvirði verður størri næstu árini afturímóti undanfarin ár. Tí kann væntast, at hereftir verður dýrari at fíggja alment hall, hjá teimum londum, ið ikki hava avbera gott kredittvirði.

Landskassin fær sambært fíggjarlógaruppskotinum fyri 2010 væntandi nettorentuútreiðslur á eini 42 mió. kr. komandi ár. Hetta tal fer at økjast komandi árini orsakað av væntaða hallinum í 2010. Metingar hjá IMF benda t.d. á, at tað almenna í ídnaðarlondunum fer at hava nettorentuútreiðslur á umleið 4% av BTÚ í miðal í 2014[11].

Eitt roknidømi At landskassin hevur uml. 2 mia. kr. í halli árini 2008-2010, merkir, at lántøkan hjá landskassanum veksur, og landskassin fær tí rentuútreiðslur av hesi skuld, sum verður at fíggja við skattainntøkum. Siga vit, at fíggingarkostnaðurin hjá landskassanum er 4% um árið, eru rentuútreiðslurnar av 2 mia. kr. í lántøku góðar 80 mió. kr. um árið[12]. Í Føroyum eru umleið 28.000 fólk í arbeiðsfjøldini. Hvør arbeiðandi føroyingur skal tí rinda einar 2.860 kr. um árið í skatti eyka bara at fíggja rentuútreiðslurnar av 2 mia. kr. í lántøku hjá landskassanum[13].

## 5.3 ER RÁSARÚM TIL STAÐAR?

Í tann mun hallið er bygnaðarligt og tískil ikki hvørvur av sær sjálvum, tá ið meira ferð kemur aftur á búskapin, er umráðandi, at farið verður undir tilgongdina at styrkja um

---

[11] Sí [6].

[12] 2 mia. kr. í lántøku hjá landskassanum er ikki óhugsandi, tá ið havt verður í huga hallið hjá landskassanum árini 2008–2010.

[13] Sí eisini dømi í [15].

førda skatta- og útreiðslupolitikkin sum skjótast og meðan tað almenna hevur fíggjarpolitiskt rásarúm, soleiðis at landskassin ikki fær stóra skuldarbyrðu at dragast við í framtíðini. Eisini skal havast í huga, at útreiðslurnar hjá landskassanum til eldraøkið vaksa munandi næstu árini orsakað av demografiskum broytingum í fólkasamansetingini. T.d. vísa framrokningar hjá arbeiðsbólki undir Fíggjarmálaráðnum, at útreiðslur til heilsu- og almannatænastur á eldraøkinum roknað í føstum 2009-prísum hækka umleið 200 mió. kr. innan 2015 uttan nakra nýskipan á eftirlønarøkinum. Tí veksur hallið hjá tí almenna við umleið 200 mió. kr. innan 2015, verða eingi tiltøk sett í verk á eftirlønarøkinum - alt annað líka[14].

### 5.3.1. Høvuðsatlit at almenna kredittvirðinum

Avgerandi fyri kredittvirðið Avgerandi fyri kredittvirðið hjá landsstýrinum eru evnini hjá landskassanum at halda sínar skyldur fyri kreditorum eitt miðallangt tíðarskeið, og harvið eisini haldførið á førda skatta- og útreiðslupolitikkinum.

Almenna kredittvirðið í einum lítlum búskapi sum tí føroyska versnar ivaleyst skjótari av tí, at skuldin veksur nógv borin saman við stór lond. Hetta er tí, at føroyski búskapurin er lutfalsliga viðbrekin fyri stoytum uttanífrá, sveiggjar meira, og tolir tí ikki somu skuldarbyrðu sum ein størri búskapur, ið sveiggjar minni og hevur betri mótstøðuføri mótvegis stoytum uttanífrá[15].

Almenna nettoskuldin Smb. talvu 5, so hevur landskassin árini 2008-2010 væntandi framvegis størri ogn enn skuld, t.v.s nettoogn. Ársskiftið 2008/2009 var nettoognin uml. 1,7 mia kr.; seinast í 2009 verður nettoognin hjá landskassanum næstan 1 mia. kr., og við væntaða hallinum hjá landskassanum í 2010 verður nettoognin væntandi næstan 200 mió. kr. Landskassin hevur eftirlønarskyldur í framtíðini fyri tænastumonnum, sum ikki eru við í talvu 5.

Umframt nettoskuldina hjá landskassanum, fevna nettoskyldurnar hjá tí almenna í Føroyum um skuldina hjá kommununum á uml. 1 mia. kr., eftirlønarskyldur í framtíðini, almenna nettoogn í grunnum umframt nettoogn í almennum og kommunalum partafeløgum.

Nettoskuldin hjá tí almenna í Føroyum er lág samanborin við flest onnur framkomin lond. Mynd 24 vísir allar nettoskyldur hjá almenna geiranum í útvaldum londum og skal tí ikki verða borin saman við nettoognina vísta í talvu 5.

Nettoskuld og kredittvirði Einki eintýtt ella beinleiðis samband er millum nettoskyldur hjá tí almenna og alment kredittvirði. USA, Stóra Bretland, Danmark, Noreg og Japan hava t.d. øll gott alment kredittvirði, hóast almennu nettoskyldurnar eru ymiskar. Harafturímóti hava Ísland og Írland verri alment kredittvirði, hóast nettoskyldurnar hjá teimum ikki eru millum tær størstu í heiminum.

[14] Sí eisini [11].

[15] Sí eisini [10].

Nettoskyldur hjá tí almenna sum partur av BTÚ, ultimo 2010 — MYND 24




Viðm: Framskriving frá OECD fyri 2010. Ognir og skyldur hjá tí almenna verða uppgjørdar ymiskt frá landi til land. Tí skulu tølini lesast við fyrivarni, sí eisini http://www.oecd.org/dataoecd/5/51/2483816.xls.

*Talið fyri Føroyar tekur støði í talvu 5, kommunuskuld á uml. 1 mia. kr. í 2010 umframt ogn í grunnum á 1,8 mia. kr. við ársenda 2010. Eftirlønarskyldur í framtíðini vænta tískil í myndini.

Kelda: Landsroknskapurin, kommunuroknskapir, Fíggjarmálaráðið, almennir roknskapir hjá grunnum og OECD

Almenna kredittvirði er sostatt treytað av øðrum enn bara almennum nettoskyldum til samans; t.d. nettoskyldum sæð í mun til mótstøðuførið móti stoytum uttanífrá, sveiggj í búskapinum, fíggjarstýring, inntøkustigi, førleika at krevja inn skattir og avgjøld sjálvstøðugt, vinnuligum bygnaði, spjaðing á vinnur, hvussu opin handilspolitikkurin er o.t.[16]

Landskassans skuld, ogn og nettoogn 2006-2010 — TALVA 5

| | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 |
|---|---|---|---|---|---|
| Bruttoskuld | 3.316 | 3.379 | 3.590 | 3.865 | 4.911 |
| Danski staturin | 500 | 500 | 500 | 500 | 500 |
| Brævlán | 2.225 | 2.160 | 2.119 | 2.694 | 3.740 |
| Onnur skuld | 592 | 719 | 971 | 671 | 671 |
| Bruttoogn | 3.959 | 5.194 | 5.282 | 4.857 | 5.133 |
| Landsbankin | 1.093 | 2.467 | 2.158 | 1.733 | 2.009 |
| Annað í umferð | 818 | 959 | 841 | 841 | 841 |
| Útbúnaður | 2.048 | 1.767 | 2.283 | 2.283 | 2.283 |
| Nettoogn | 643 | 1.815 | 1.692 | 992 | 222 |
| Nettoogn uttan útbúnað | -1.405 | 48 | -591 | -1.291 | -2.061 |

Viðm: 2009 og 2010 eru fyribilstøl
Kelda: Landsbanki Føroya

Rásarúm og kredittvirði Meginreglan, at tað almenna í Føroyum eigur til eina og hvørja tíð at stremba eftir fíggjarligum rásarúmi, er sostatt nær tengd at atlitinum at kredittvirðinum hjá almenna geiranum/landskassanum, og spurningurin er í høvuðsheitum, hvussu mong ár landskassin og almenni geirin kunnu hava lutfalsliga stórt hall, áðrenn kredittvirðið hjá landsstýrinum versnar og kostnaðurin av at fíggja hall í framtíðini harvið veksur.

Tó kann verða staðfest, at so leingi landskassin hevur hall, minkar rásarúmið. Og so leingi hall er, vaksa rentuútreiðslurnar, samstundis sum greitt er, at m.a. almennar útreiðslur vaksa næstu árini av demografiskum broytingum. Hetta undirstrikar týdningin, at tað skal sum skjótast vera ein greið ætlan fyri langtíðarjavnvág, tí tess longri tíð gongur, størri er vandin fyri, at neyðugt verður við harðligum inntrivum og skerjingum seinri.

[16] Sí eisini [1], [21] og [2].

Óvissan um, hvussu hallið hjá tí almenna í Føroyum er konjunkturelt ella bygnaðarligt, eigur ikki at verða nýtt sum grundgeving at útseta eina tilgongd at fáa almennar inntøkur og útreiðslur at javnviga aftur. Óvissan og væntandi neyv vitan um, hvussu hallið er bygnaðarligt, eigur heldur at skunda undir, at farið verður undir hesa tilgongd. Búskaparráðið mælir tí til, at farið verður undir tilgongdina at fáa javnvág á almennar inntøkur og útreiðslur sum skjótast meðan fíggjarpolitiskt rásarúm er, soleiðis at sleppast kann undan at gera harðligari tillagingar í almennum inntøkum og útreiðslum seinri.

*Tað er umráðandi fyri kredittvirðið og haldførið á fíggjarpolitikkinum, at ein miðvís og bindandi ætlan er fyri, hvussu javnvág aftur fæst á almennum inntøkum og útreiðslum. Eisini er umráðandi, at dygg politisk undirtøka er fyri ætlanunum. Hetta bøtir um trúvirðið á ætlanunum og um sannlíkindini, at tær bera á mál.*

# 6. FÍGGJARPOLITISK ÁTØK

## 6.1 RÚMKA INNTØKUGRUNDARLAG

Árini 2008 og 2009 hava víst, hvussu nógv inntøkurnar hjá landskassanum kunnu sveiggja í eini konjunkturniðurgongd. T.d. minka skatta- og avgjaldsinntøkurnar hjá landskassanum góð 4% í 2009 borið saman við 2008 sambært fíggjarætlanartølum, meðan danska fíggjarmálaráðið væntar, at skatta- og avgjaldsinntøkur hjá danska statskassanum minka eini 2% í 2009 borið saman við árið fyri.[17] Hetta er hóast skattalættar eru givnir í Danmark og ein skattalætti er tikin aftur í Føroyum í 2009.

Hugsa vit um sveiggini í skatta- og avgjaldsinntøkunum hjá landskassanum, hevði verið skilagott at rúmkað inntøkugrundarlagið hjá tí almenna í Føroyum. Hetta hevði gjørt, at minni partur av inntøkunum stavaði frá lønar- og nýtsluskatti, og óivað gjørt inntøkurnar hjá landskassanum støðugari. Ítøkiliga eru fleiri hættir at rúmka inntøkugrundarlagið. T.d. kann skattagrundarlagið verða rúmkað.

Lutfalsliga trongt skattagrundarlag Skattagrundarlagið í Føroyum er líkt skattagrundarlagnum í grannalondunum, tó at tað ikki er eins rúmt. Bústaðarskattur er ikki í Føroyum, og fleiri umhvørvisavgjøld eru í grannalondunum. Harafturat stavar ein stórur partur av skattainntøkunum í Føroyum frá lønar- og nýtsluskatti. Talva 6 vísir býtið av skattainntøkum í Danmark og í Føroyum í 2007, býtt á nakrar høvuðsskattir.

Talvan vísir, at størri partur av skattainntøkunum í Føroyum stavar frá høvuðsskattakeldunum, lønarskatti og meirvirðisgjaldi. Tí hevði helst verið skilagott at rúmkað skattagrundarlagið við øðrum skattakeldum.

Skattainntøkur hjá tí almenna, % av samlaðum skattainntøkum, 2007 — TALVA 6

| | Føroyar | Danmark |
|---|---|---|
| Partafelagsskattur | 5,1 | 7,4 |
| Inntøkuskattur* | 48,7 | 39,1 |
| Skrásetingargjald | 2,7 | 2,9 |
| Meirvirðisgjald | 26,6 | 21,3 |
| Bústaðarskattur | 0,0 | 3,7 |
| Aðrir skattir | 16,7 | 25,6 |
| Tilsamans | 100,0 | 100,0 |

Viðm: Til land og kommunur
Kelda: Danmarks Statistik, Landsroknskapurin

Partafelagsskatturin er lægri í Føroyum, bústaðir verða ikki skattaðir í Føroyum, skrásetingargjøld á akfør eru lægri, eins og umhvørvisavgjøld ikki eru í Føroyum sum í Danmark. Umhvørvisavgjøld vóru um 9,5% av øllum skattainntøkunum hjá tí almenna í Danmark í 2007[18]. Brennioljugjaldið, umhvørvisavgjaldið á smyrjiolju, vegskatturin, skrásetingargjaldið á akfør og ferðaavgjald kunnu við fyrivarni verða kallað umhvørvisavgjøld. Hesi avgjøld vóru til samans góð 5,4% av skatta- og avgjaldsinntøkunum hjá tí almenna í Føroyum í 2008.

[17] Sí [13].

[18] Sí [8, bls. 140–141].

Við at fáa skattainntøkur frá øðrum skattakeldum enn lønarskatti og meirvirðisgjaldi verða skattainntøkurnar hjá tí almenna støðugari, eins og skattaskipanin verður meira sosialt rættvís og samhaldsføst, umframt at til ber at hava lægri skatt á lønarinntøku, soleiðis at hugurin hjá fólki at arbeiða verður ávirkaður sum minst.

Marginalskatturin Hægsti marginalskattur í Føroyum er í 2009 60,47%[19] í teimum kommunum við hægsta skattaprosentinum (23,5%). Í Tórshavnar kommunu (19,75% í kommunuskatti) er hægsti marginalskattur 56,72%. Hetta er áleið sama hægsta marginala skattaprosent sum í grannalondunum, tó undantikið Ísland, sí talvu 7. Kommunuskattaprosentið í Føroyum er í miðal 20,78%; í hesum kommunum er hægsta marginalskattaprosent 57,75%.[20]

Hægsta marginala skattaprosent, býtt á lond, 2008 — TALVA 7

| DK | FO | SE | FI | NO | ÍS | USA | UK |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 63,0 | 60,5 | 56,4 | 55,6 | 47,8 | 34,3 | 43,2 | 41,0 |

Viðm: Talið fyri Føroyar er frá skattastiganum fyri 2009
Kelda: OECD og TAKS

Tað er neyvan skilagott at hækka marginalskattin munandi. Vandi er fyri, at hetta ávirkar hugin hjá fólki at arbeiða og búleikast her.

Væntandi brúkaragjøld Brúkaragjøld ella lutvís brúkaragjøld á tænastur frá tí almenna er eisini ein háttur at vaksa um almennu inntøkurnar. Fleiri dømir eru longu um slík gjøld, t.d. á barnaansing, tænnlæknaviðgerð, ymsum heilivági og á pørtum av samferðslukervinum. Ein fyrimunur við brúkaragjøldum er, at tey kunnu vera við til at tryggja, at tænastur ikki verða latnar í førum, har tørvur ikki er á teimum. Brúkaragjøld kunnu eisini verða nýtt sum stýriamboð at stýra eftirspurninginum eftir almennum tænastum. Brúkaragjaldsskipanir eiga at verða sameindar, soleiðis at tað almenna letur borgarum við vánaligari fíggjarstøðu stuðul, teimum, ið hava stuðul fyri neyðini. Brúkaragjøld eru helst neyðug, skal verða bøtt munandi um almenna bygnaðin.

## 6.2 RAÐFESTA ÍLØGUR

Búskaparráðið mælir til raðfesta íløgur skilagott næstu árini. Allar stórar almennar íløgur[21] eiga at verða skipaðar í langtíðarkarm (sí eisini brot 6.3), sum breið politisk semja er um. Íløgur hjá tí almenna í samferðslukervið, heilsu-, skúla- og almannaøkið eiga at verða raðfestar eftir framleiðsluevnunum hjá búskapinum í framtíðini.

Vinnuligar íløgur Vinnuligar fyritøkur haldast at raðfesta sínar íløgur eftir sínum rakstrarliga avkasti, soleiðis at íløgurnar styrkja raksturin hjá fyritøkuni í framtíðini. Avbjóðingin hjá tí almenna er tí at geva tílíkar karmar, at vinnuligu íløgurnar eisini geva samfelagsligt avkast og búskaparligan vøkstur.

[19] 33% í landsskatti + 23,5% í kommunuskatti + 1,75% til AMEG + 0,62% til Barsilsgrunnin + 1% til ALS.

[20] Landsstýrið hevur í umbúna at hækka skattin á inntøkur yvir 400.000 kr. úr 33% upp í 35%. Verður hetta framt, skulu 2%-stig verða løgd afturat nevndu tølum omanfyri.

[21] Her verður hugsað um almennar íløgur hjá landi, kommunum, grunnum, almennum partafeløgum og kommunalum felagsskapum.

Grundleggjandi krøv Krøvini til almennar íløgur eru meira samansett enn tey hjá vinnuligum fyritøkum. Trý fyrilit ganga aftur í fakbókmentum[22] um at raðfesta skattafíggjaðar íløgur:

1. Allokeringsfyrilit[23]

2. Býtisfyrilit

3. Konjunkturpolitisk fyrilit

Allokeringsfyrilitið er í nevndu bókmentum tað mest týðandi, tí at tað hevur størstan týdning fyri vælferð og vøkstri. Stórar og breiðar almennar íløguætlanir tykjast ikki í sær sjálvum at geva avgerandi ískoyti til vælferð og vøkstur. Heilt avgerandi er tí, at hvør einstøk íløguverkætlan verður greinað nágreiniliga, mett um og raðfest, áðrenn hon verður sett í verk.

Býtisfyrilitið verður røkt í skattaskipanini, inntøkuveitingunum og almennu tænastunum. Almennar íløgur kunnu síggjast sum partur av hesi útjavning, tí at almennar tænastur á henda hátt verða veittar borgarum.

Konjunkturpolitisk fyrilit kunnu neyvan vera høvuðsgrundgevingin fyri at fremja almennar íløgur. Harafturímóti eigur neyðugt rásarúm við tøkari arbeiðsmegi og kapasiteti at vera eitt konjunkturpolitiskt fyrilit, tá almennar íløgur vera fyrireikaðar. Royndirnar[24] vísa, at almennar íløgur ikki altíð virka so væl at stýra konjunkturum. Tó eru dømi um, at almennar íløgur hava verið brúktar sum partur av konjunkturjavnandi politikki við góðum úrsliti.

Neyðug atlit Samfelagið er støðugt fyri nýggjum avbjóðingum, sum eisini eiga at fáa ávirkan á m.a. almennu íløgurnar. Tískil er tað ein ógvuliga stór avbjóðing og uppgáva at viðgera almennar íløgur í politisku skipanini. Mælt verður tí til, at einhvør almenn íløga og íløguraðfesting tekur atlit at m.ø. hesum spurningum:

- Demografiskar broytingar fara fram, fólk gerast lutfalsliga eldri, og lutfalsliga færri verða til at skapa tær inntøkur, sum skulu fíggja almenna raksturin. Hvørja ávirkan skal tað fáa fyri íløgur í almanna- og heilsurøkt?

- Altjóðagerðin broytir fortreytir fyri samhandli. Hvørja ávirkan skal tað fáa fyri íløgur í infrakervi og fólkaflutning og góðsflutning?

- Tørvur er á ungum fólki við útbúgving fyri at styrkja framleiðsluførleikan í Føroyum. Hvørja ávirkan skal hetta hava á íløgur í tænastutilboð, gransking o.a.?

- Umhvørvið setir vaksandi krøv, og orkan verður alsamt dýrari. Hvørja ávirkan skal hesin spurningur fáa á almennar íløgur?

---

[22] Sí [12, s. 7-41].

[23] Búskaparfrøðiligt heiti fyri tillutan og effektiva nýtslu av knøppum tilfeingi.

[24] Sí [12, s. 13].

- Kommunurnar fáa vaksandi part av almennum uppgávum, soleiðis at spurningar at raðfesta íløgur gerast margfaldari og fløktari. Hvørja ávirkan skal hetta fáa á at skipa raðfestingar?

Reglur fyri íløguverkætlanum Landsstýrið eigur tí at áseta greiðar reglur fyri, hvørja tilgongd hvør einstøk verkætlan eigur at fara ígjøgnum fyri at meta um øll fyrilit, sum eiga at verða tikin. Eisini eigur landsstýrið at fyrireika karmar við greiðum eggjanum og krøvum til verkætlanir hjá kommunum og almennum fyritøkum fyri at verkætlanir kunnu verða settar í verk.

Nakað av týdningarmiklum arbeiði at raðfesta íløgur er gjørt. Vinnumálaráðið gav í 2006 út "Samferðsluætlan 2008-2020"[25], har allar samferðsluætlanir eru lýstar og virðismettar eftir samfelagsligum gagni. Tílíkar virðismetingar eiga at vera fastur táttur í tilgongdini fyri allar almennar íløguverkætlanir – fyri samferðsluíløgur, sum gjørt er her, og fyri íløgur í útbúgving, gransking, heilsurøkt, almmannarøkt o.a.

Íløgur og rásarúm Frammanfyri[26] er gjørt vart við, at íløgupolitikkurin eigur at vera lagaður eftir tí rásarúmi, sum politikkurin annars hevur skapt. Greiðar ábendingar[27] eru um, at partur av almenna hallinum er bygnaðarligur. Soleiðis sum hetta er rætt, so er ikki skapt rásarúm fyri almennum íløgum, og so eiga íløgurnar at verða lækkaðar ella inntøkurnar at verða hækkaðar.

Almennu íløgurnar lutfalsliga stórar Almennu íløgurnar í Føroyum[28] eru nógv størri partur av tøku bruttotjóðarinntøkuni enn t.d. í Danmark, sum víst í mynd 25. Tað er tí ógvuliga umráðandi at fáa mett um samfelagsliga gagnið av hesum stóru almennu íløgunum, soleiðis at støða kann verða tikin til, um tað er rætt at hækka almennu inntøkurnar fyri at skapa tað neyðuga rásarúmið fyri teimum íløgum, sum eru alneyðugar, ella at íløgurnar eiga at lækka, tí at tær gagna ikki nóg mikið.

tBTI býtt á nýtslu og bruttosparing* MYND 25




Viðm: Bruttosparing = innlendis íløgur + rakstrarjavni gjaldsjavnans
Kelda: Hagstova Føroya (uppgerð 1998-2006), Landsbanki Føroya (meting 2008 og 2010) og OECD fyri Danmark

[25] Sí [27].

[26] Sí brot 4.3.

[27] Sí brot 5.1.1.

[28] Føroyski tjóðarroknskapurin hevur annan uppgerðarhátt fyri býtið millum almennan rakstur og íløgur enn í øðrum londum, av tí at tað at halda vegir og havnir verður tikið við í íløgur. Føroysku íløgurnar vera tí ov stórar í sammetingum.

## 6.3 FÍGGJARSTÝRA LANDI OG KOMMUNUM

Vantandi samskipan viðvíkjandi fíggjarætlanum Stórur trupulleiki í fíggarpolitikkinum snýr seg um vantandi samskipan viðvíkjandi fíggjarætlanunum hjá ymsu pørtunum hjá tí almenna. Hesin trupulleikin gerst ikki minni, so hvørt fleiri og størri uppgávur verða fluttar frá landi til kommunur. Sama er galdandi í sambandi við samfelagsligar uppgávur, sum t.d. kommunalir felagsskapir og almenn partafeløg taka sær av.

Áður hevur ávís fíggjarpolitisk samskipan millum land og kommunur verið roynd við at áseta ein íløgukarm fyri land og kommunur undir einum, og sum hóskaði til konjunkturútlitini fyri føroyska búskapin. Neyvan ber til at siga, at hendan skipan virkaði heilt eftir ætlan, m.a. tí at greiðar reglur ikki vóru fyri, hvørjar útreiðslur skuldu roknast sum íløgur og ikki. Íløgusamskipanin datt niðurfyri fyri nøkrum árum síðani, og hevur støðan seinastu árini verið merkt av, at fíggjarpolitiska ávirkanin frá kommunalu fíggjarætlanunum hevur verið stimbrandi, samstundis sum sama hevur verið galdandi fyri landsfíggjarætlanina (fíggjarlógina) - alt hetta í hákonjunkturstøðu, sum talaði fyri, at eftirspurningurin frá almennu kassunum undir einum virkaði tálmandi.

Møgulig frambrot Ávís frambrot tykjast tó at vera komin undir land, ið kunnu hava við sær, at fíggjarpolitikkurin næstu árini kann koma upp á eitt hægri støði.

1) Nýggj játtanarskipan Tað má metast vera eitt framstig, at nýggja játtanarskipanin birtir uppundir, at politiska skipanin í apríl kemur fram til, hvør heildarútreiðslu- og inntøkukarmurin hjá landskassanum skal vera fyri næsta fíggjarár. Hetta er ásett í grein 8 í lóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan. Sambært hesi grein bindur løgtingið landsstýrið hereftir at koma við einum ítøkiligari fíggjarlógaruppskoti, sum samsvarar við karmin, sum tingið hevur gjørt samtykt um.

Henda nýggja skipanin skal á fyrsta sinni standa sína roynd í sambandi við fíggjarlógaruppskotið fyri 2010. Landsstýrið hevur lagt fíggjarlógaruppskot fyri 2010 fram, sum er samsvarandi løgtingssamtykt í tingmálinum nr 8/2009. Tað er við hesum eydnast løgtinginum at binda landsstýrið til ávísan fíggjarpolitiskan aga. Eftir stendur nú hjá tinginum at prógva, at samsvarandi agi eisini er í tinginum. Hetta gerst, við at løgtingið ikki - uttan so at sera átrokandi makrobúskaparlig viðurskifti tala fyri hesum - broytir teir karmar, sum løgtingið sjálvt hevur samtykt at galda um fíggjarlógaruppskotið fyri 2010.

2) Kunngerð um roknskaparverk kommunanna Í øðrum lagi kann vísast á kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommunanna. Henda kunngerð áleggur kommununum at seta upp fíggjarætlan og roknskap eftir sama leisti, sum galdandi er fyri stovnarnar, sum fevndir eru av fíggjarlógini. Verður nýggja kunngerðin handhevjað, eru stórir hagfrøðiligir trupulleikar viðvíkjandi kommunala búskapinum burturbeindir. Við hesum kann í næstu árum eitt sterkt talgrundarlag verða skipað, sum ger tað møguligt at samskipa ávirkanina frá landi og kommunum á heildareftirspurningin í búskapi okkara.

Hóast hesi frambrot - sum vónandi standa sína roynd í ár og næstu árini - er neyðugt við fleiri átøkum til tess at fremja eitt veruligt fíggjarpolitiskt siðaskifti.

Mælt verður í hesum viðfangi til, at landsmyndugleikarnir í samstarvi við kommunurnar royna at fáa í lag skipan, ið hevur við sær, at karmur um inntøkur og útreiðslur hjá landi

og kommunum undir einum verður avráddur í góðari tíð í árinum, sum er fyri næsta fíggjarár. Neyðugt er, at slíkur karmur verður ásettur við neyvum atliti at fíggjarpolitiskum málum, sum røkka nøkur ár fram í tíð.

## ORÐALISTI

Orðalistin er ein lýsing av nøkrum av búskaparligu hugtøkunum, sum eru nýtt í frágreiðingini.

Arbeiðsfjøld
Tey, sum hava arbeiði, og tey, sum eru arbeiðsleys samantald

Arbeiðsleys
Tey, sum eru arbeiðsleys, men sum eru tøk á arbeiðsmarknaðinum og leita eftir arbeiði og sostatt eru partur av arbeiðsfjøldini

Arbeiðsloysi
Arbeiðsleys í % av arbeiðsfjøldini

Automatiskir stabilisatorar
Automatiskar fíggjarpolitiskar ávirkanir sum standast av almennum inntøkum og útreiðslum ávirkast av búskaparstøðuni. Búskapurin verður soleiðis í ávísum førum av sær sjálvum støðugari, við tað at almennar inntøkur vaksa í búskaparligari uppgongd og minka í búskaparligari niðurgongd

Avreiðingar
feskfiskaveiðan ( av botnfiski og øðrum fiski) skrásett um avreiðingarskipanina. Mátað í virði ella í nøgd

Brúkaraprístal
Mátar allan prísvøksturin á øllum vørum og tænastum. Mátar prísirnar, ið brúkarin rindar fyri vørur og tænastur, tá ið tær verða keyptar frá veitarum

Bruttotjóðarúrtøka
Er eitt mát fyri alla inntøkuna, ið er skapað í einum landi ella búskapi ávíst tíðarskeið. Verður ofta mett at vera høvuðsmátið fyri búskaparligt virksemi. BTÚ er ikki fullkomið mát fyri inntøku ella framleiðslu í einum landi. T.d. leggur tað ikki upp fyri sliti viðvíkjandi tilfeingi (náttúru- ella øðrum tilfeingi) ella útbúnaði. Eisini roynir BTÚ at máta allar vørur og tænastur til ein "marknaðarprís", hóast allar vørur og tænastur ikki hava ein marknaðarprís, t.d. skúla- og heilsutænastur. At enda sigur mátið einki um, hvussu javnt inntøkan er býtt á íbúgvar í einum landi. Sostatt sigur mátið einki um livisgrundarlagið hjá einum "vanligum" íbúgva í einum landi

Bygnaðarpolitikkur
Búskaparpolitisk tiltøk, sum hava langtíðar mál, og sum vanliga hava sum endamál at bøta um marknaðarmekanismur á ávísum marknaðum, t.d. á arbeiðsmarknaðinum, fíggjarmarknaðinum og marknaðum fyri vørur og tænastur

Eftirspurningur
Heildarnøgdin av vørum og tænastum húsarhald, vinnan, tað almenna og umheimurin vilja keypa

Evruøkið
Økið ið er skipað av teimum limalondum í Evropiska Samveldinum, har evran verður nýtt sum gjaldoyrað

Fíggjarpolitikkur
Búskaparpolitisk tiltøk, ið hava sum endamál at stýra og minka búskaparlig sveiggj. Skilt verður vanliga millum at føra *virknan fíggjarpolitik* og at brúka "*automatiskar stabilisatorar,"*

Framleiðsla
Nýtsla av tilfeingi og útbúnaði at gera vørur og tænastur sum hava virði. Virðið á framleiðslu verður mátað í føstum prísum, t.e. eftir vanligan prísvøkstur.

Framleiðsluavrik (produktivitetur)
Virðisvøkstur fyri hvørja eind av tilfeingi nýtt í framleiðsluni (t.d. fyri hvørja eind av arbeiðsmegi).Framleiðsluavrik verður roknað realt, t.e. í føstum prísum ella frároknað vanligan prísvøkstur.

Framleiðsluevni
Tann virðisøking ein búskapur ella ein vinnufyritøka kunnu framleiða við tøka tilfeinginum og tøka útbúnaðinum.

G7-londini
Bólkur av størri ídnaðarlondum, ið telur Frakland, Týskland, Italia, Japan, Stóra Bretland og USA.

Gjaldsjavni
Hagfrøðilig uppgerð ið tekur samanum allar búskaparligar flytingum hjá einum landi við umheimin eitt ávíst tíðarskeið og mátað í sama gjaldoyra. Mest nýtta konta í gjaldsjavnanum er "rakstrarviðskifti gjaldsjavnans" (á enskum "current account"), ið fevnir um vøruflytingar og tænastuflytingar umframt lønar- og inntøkuflytingar millum íbúgvarnar í einum landi og umheimin.

Handilsjavni
Heildarvirðið á uttanlandshandli (t.e. inn- og útflutningi) av vørum hjá einum landi við umheimin. Mátað í sama gjaldoyra og eitt ávíst tíðarskeið. Javnin verður ofta uppgjørdur sum útflutningur minus innflutningur (t.e. nettoútflutningur).

IMF
Altjóða Gjaldoyragrunnurin (International Monetary Fund, Washington). Stovnaður 27. desember 1945 við Bretton Woods-avtaluni.

Inflasjón
Hækking í prísleguni á vørum, tænastum og lønum í tíð. Verður ofta kallað vanligur prísvøkstur og mátað sum %-vøkstur í brúkaraprístalinum ella í øðrum prístali.

Javni
Uppgerð av heildarvirðinum á fíggjarligum ognum og skyldum hjá eini fyritøku (ella einum húsarhaldi), mátað eina ávísa tíð, t.d. seinast í einum fíggjarári.

Kapasitetsmark

Framleiðslan, sum búskapurin í mesta lagi kann framleiða við tøka tilfeinginum og útbúnaðinum, sum eru.

Kapasitetstrýst

Búskapurin framleiðir tætt við kapasitetsmarkið. T.e. búskapurin kann ikki framleiða meiri við tøka tilfeinginum og útbúnaðinum, sum eru. Meiri eftirspurningur t.d. frá tí almenna ella húsarhaldum hevur í eini tílíkari støðu lyndi at elva til prísvøkstur, versnandi kappingarføri og innflutning heldur enn til meiri framleiðslu.

Konjunkturar

Stutttíðarsveiggj í búskaparligari framleiðslu og í arbeiðsloysi samsvarandi høvuðsgongdini í longri tíð.

Kredittvirði

Evnini hjá einum lántakara at rinda einum lánveitara lán aftur eftir lánitreytunum. Aloftast mátað sum sannlíkindini, at ein lántakari fer at rinda lánið aftur eftir lánitreytunum. Kredittvirðið er avgerandi fyri, hvørja rentu og hvørjar treytir ein lántakari kann læna pening fyri.

Marginalskattur

%-partur av seinast vunnu lønarinntøku, ið verður at rinda í skatti til tað almenna.

Marknaðarprísir

Prísirnir, sum vørur og tænastur verða umsett fyri. T.e. roknað uppí framleiðsluskattir men frádrigið vørustuðul.

Nettotilflyting

Tilfutt fólk, fráflutt fólk . Talan er um nettotilflyting, eru tilflutt fólk fleiri enn fráflutt.

Niðurskriving

Tillaging niðureftir av virðinum á einum útláni hjá einum fíggjarstovni til ein lántakara. Soleiðis sum staðfest verður, at lánið *lutvíst* ikki verður afturgoldið, er talan um niðurskriving.

OECD-londini

Limalondini í felagsskapinum Organisation for Economic Co-operation and Development. Limalondini eru 30 í tali og verða vanliga roknað sum framkomin lond og hava øll høgt inntøkustig.

Rentumunur

Munurin millum inn- og útlánsrenturnar hjá peninga- og fíggjarstovnum í miðal. Rentumunurin er týdningarmesta inntøkukeldan hjá peninga- og fíggjarstovnum. Eisini kallað rentumarginalur.

RLÚ-avlop

Avlopið á rakstrar-, løgu- og útlánskontuni hjá landskassanum. Rakstrar-, løgu- og útlánsavlopið hjá landskassanum er rakstrar- og kapitalavlop netto frádrigið útlán til privat og rættað fyri munir í uppgerðum av ávísum inntøkum.

Skattagrundarlag
Tær inntøkur, sum skattur skal verða beinleiðis rindaður av, umframt tær flytingar, sum óbeinleiðis skattur skal verða rindaður av.

Skattur og avgjøld
Kravd gjøld til tað almenna uttan nakra ávísa ella serliga mótveiting frá tí almenna.

Skuld
Upphædd sum búskaparlig eind (t.d. fyritøka, persónur ella land) skyldar aðrari búskaparligari eind.

Sosialir grunnar
Arbeiðsloysisskipanin (eisini kallað ALS), Samhaldsfasti Arbeiðsmarknaðareftirlønar-grunnurin (eisini kallaðar, AMEG, SAMEG ella AMG), Barsilsskipanin og sjúkrakassarnir.

Tað almenna
Landið (landskassin), kommunurnar, sosialir grunnar, ríkisfyrisitingin, almenn og kommunal partafeløg.

Tap
Flutt lán heilt av javnanum hjá einum fíggjarstovni. Alt eftir sum staðfest verður, at lánið ikki verður afturgoldið, er talan um tap.

Uppsparing
Munurin millum inntøku og nýtslu hjá ávísari búskaparligari eind (t.d. einum húsarhaldi ella eini fyritøku).

Útboð
Vørunøgdin til samans og tænastur, ið eru tøk hjá húsarhaldum, vinnuni, tí almenna og umheiminum at keypa.

Virðisvøkstur
Munurin á virðinum á framleiðsluni og virðinum á nýtslu í framleiðsluni. T.e. tað virðið, ið verður lagt aftrat virðinum á nýtsluni (t.d. rávøru) við góðsking í framleiðsluni.

Vøru- og tænastujavni
Fevnir umframt um handilsjavnan um uttanlandshandil av tænastum hjá einum landi við umheimin, t.d. skipaflutningur, flogferðsla og aðrar tænastur. Mátað í sama gjaldoyra og eitt ávíst tíðarskeið.

# BÓKMENTIR


[1] António Afonso, Pedro Gomes og Philipp Rother. What “Hides” Behind Sovereign Debt Ratings? ECB Working Paper Series no 711. Grein tøk á www.ecb.europa.eu, januar 2007

[2] Ioana Alexopoulou, Irina Bunda og Annalisa Ferrando. Determinants of Government Bond Spreads in New EU Countries. ECB Working Paper Series no 1093. Grein tøk á www.ecb.europa.eu, september 2009

[3] Thomas Baunsgaard og Steven A. Symansky. Automatic Fiscal Stabilizers. IMF Sta Position Note. Grein tøk á www.imf.org/external/pubind.htm, september 2009

[4] Olivier Blanchard. Commentary. Federeal Reserve Bank of New York. Economic Policy Review. Grein tøk á www.ny.frb.org/research/epr/00v06n1/0004blan.pdf, apríl 2000

[5] Búskaparráðið. Búskaparfrágreiðing, decembur 2000. Frágreiðing tøk á www.buskap.fo, 2000

[6] Carlo Cottarelli og Jose Viñals. A Strategy for Renormalizing Fiscal and Monetary Policies in Advanced Economies. IMF Sta Position Note. Grein tøk á www.imf.org/external/pubind.htm, september 2009

[7] Danmarks Statistik. Statistisk Tiårsoversigt 2002. Danmarks Statistik, København, 2002

[8] Danmarks Statistik. Statistisk Tiårsoversigt 2008. Danmarks Statistik, København, 2008

[9] ECB. Challenges to Fiscal Sustainability in the Euro Area. ECB Monthly Bulletin February 2007, bls. 59–72. Tøkt á www.ecb.europa.eu, 2007

[10] ECB. The Impact of Government Support to the Banking Sector on Euro Area Public Finances. ECB Monthly Bulletin July 2009, bls. 63–74. Tøkt á www.ecb.europa.eu, 2009

[11] Fíggjarmálaráðið. Pensjónsnýskipan 2009. Álit um eftirlønarnýskipan fyri Føroyar. Álit tøkt á www.fmr.fo, 2009

[12] Finansministeriet. Redegørelse om offentlige investeringer, januar 2001. Rit tøkt á www.fm.dk, januar 2001.

[13] Finansministeriet. Økonomisk Redegørelse, august 2009. Frágreiðing tøk á www.fm.dk/Publikationer.aspx, 2009

[14] Nicola Giammarioli, Christiane Nickel, Philipp Rother og Jean-Pierre Vidal. Assessing Fiscal Soundness: Theory and Practice. ECB Occasional Paper Series no 56. Grein tøk á www.ecb.europa.eu, marts 2007

[15] Jens Henriksson. Ten Lessons About Budget Consolidation. Bruegel Essay and Lecture Series. Grein tøk á www.bruegel.org, juli 2007.

[16] Mark Horton, Manmohan Kumar og Paolo Mauro. The State of Public Finances: A Cross-Country Fiscal Monitor. IMF Staff Position Note. Grein tøk á www.imf.org/external/pubind.htm, juli 2009.

[17] IMF. Fiscal Policy as a Countercyclical Tool. IMF World Economic Outlook, October 2008, bls. 159–196. Tøkt á www.imf.org/external/pubind.htm, oktober 2008.

[18] IMF. Fiscal Implications of the Global Economic and Financial Crisis. IMF Staff Position Note. Grein tøk á www.imf.org/external/pubind.htm, juni 2009.

[19] IMF. From Recession to Recovery: How Soon and How Strong. IMF World Economic Outlook, April 2009, bls. 103–138. Tøkt á www.imf.org/external/pubind.htm, apríl 2009.

[20] Lars Kirk Knudsen, Thomas Larsen og Niels Jørgen Mau Pedersen. Den offentlige sektor. Handelshøjskolens Forlag, København, 5. udgave, 2002.

[21] Simone Manganelli og Guido Wolswijk. Market Discipline, Financial Integration and Fiscal Rules: What Drives Spreads in the Euro Area Government Bond Market? ECB Working Paper Series no 745. Grein tøk á www.ecb.europa.eu, apríl 2007.

[22] Norðuratlantsbólkurin á Fólkatingi. Eg vil so fegin hava, at børnini læra føroyskt. Rit um útisetar. Rit tøkt á www.dnag.dk, 2008.

[23] Norðuratlantsbólkurin á Fólkatingi. Hví føroyingar búseta seg í Danmark. Rit um útisetar. Rit tøkt á www.dnag.dk, 2008.

[24] Jákup Reinert. Fundur í ráðgevandi nevndini (ACOM) hjá Altjóða Havrannsóknarstovninum (ICES) í mai/juni 2009. HAV smárit 09/01. Rit tøkt á www.frs.fo, 2009.

[25] Antonio Spilimbergo, Steve Symanski, Olivier Blanchard og Carlo Cottarelli. Fiscal Policy for the Crisis. IMF Staff Position Note. Grein tøk á www.imf.org/external/pubind.htm, desember 2008.

[26] Petur Steingrund. Náttúrlig sveiggj og broytingar í veiðievnum hjá føroyska botnfiskaflotanum seinastu tjúgu árini. FRS smárit 08/01. Rit tøkt á www.frs.fo, juni 2008.

[27] Vinnumálaráðið. Samferðsluætlan 2008-2020. Strategiskjal tøkt á www.vmr.fo Vinnumálaráðið, mai 2007.

[28] Ann-Louise Winther. Virkning af finanspolitik under krisen. Danmarks Nationalbank. Kvartalsoversigt, 3. kvartal 2009, bls. 79–91. Grein tøk á www.nationalbanken.dk, 2009.